Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	30. jan. 2024
Mál nr.:	23/18810
Málsviðgjørt:	SSJ/ABD
Ummælistíð:	3. okt. - 31. okt. 2023
Eftirkannað:	12.12.2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi
(Innheinting og skráseting av upplýsingum um veruligar eigarar, tvingsilsavtøka o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, § 1 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, § 1 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, § 11 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, og § 20 í løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023,verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 7 c, stk. 2, 2. pkt.verður aftan á "víkjast kann" sett: "ikki".

2. Í § 52, stk. 2 verður "eintýddað eyðmerking" broytt til: "eintýdda eyðmerking".

3. Í § 55, stk. 2 verður "verða roknaðir:" broytt til: "verða roknaðir uppí:"

4. § 58, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Tá eitt kapitalfelag verður stovnað, skulu felagsins kapitaleigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpørtum, sbrt. § 55, stk. 1, skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av felagnum, sbrt. § 9. Eru ongir kapitaleigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpørtum, skal hetta somuleiðis skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av felagnum."

5. § 58 a verður orðað soleiðis:

"**§ 58 a.** Felagið skal fáa til vegar upplýsingar um veruligu eigarar

felagsins, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
Stk. 2. Ein og hvør, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á felagnum, skal eftir áheitan frá felagnum lata felagnum tær upplýsingar um ognarviðurskiftini, sum eru neyðugar, til tess at felagið kann eyðmerkja veruligu eigararnar, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
Stk. 3. Felagið skal skjótast gjørligt, eftir at felagið er vorðið kunnugt við, at ein persónur er blivin veruligur eigari, skráseta upplýsingarnar, heruppií upplýsingar um rættindini hjá teimum veruligu eigarunum, í kt-skipan Skráseting Føroya. Ein og hvør broyting í teimum upplýsingum, sum eru skrásettar um veruligu eigararnar, skal skrásetast skjótast gjørligt eftir, at felagið er vorðið kunnugt við broytingina. Teir skrásettu limirnir í dagligu leiðslu felagsins, sbr. § 10, stk. 1, skulu roknast og skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya, sum veruligir eigarar, um so er, at felagið, eftir at hava troytt allar møguleikar fyri eyðmerking, eftir hetta ongar veruligar eigarar hevur, ella ongar veruligar eigarar kann eyðmerkja.
Stk. 4. Kapitalfelagið skal í minsta lagi eina ferð um árið kanna, um broytingar skulu gerast í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar. Úrslitið av árligu kanningini skal leggjast fram á fundinum, har høvuðsleiðslan góðkennir ársfrásøgnina.
Stk. 5. Felagið skal goyma skjalprógv um upplýsingarnar um veruligu eigarar tess í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Felagið skal harumframt goyma skjalprógv fyri teimum savnaðu upplýsingunum um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
Stk. 6. Felagið skal eftir áheitan lata upplýsingar til Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet um veruligu eigarar felagsins, heruppií um royndir at eyðmerkja felagsins veruligu eigarar. Felagið skal harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar málførar myndugleikar, tá ið hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlitsuppgávum ella umsjónaruppgávum teirra.
Stk. 7. Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet og aðrir málførir myndugleikar kunnu uttan viðurgjald lata upplýsingar víðari um veruligar eigarar, sum eru skrásettar sbrt. stk. 3, ella sum eru savnaðar sbrt. stk. 6, til málførar myndugleikar og eftirlitsmyndugleikar á fíggjarøkinum í ES-limalondum.
Stk. 8. Stk. 1-7 verða ikki nýtt upp á feløg, hvørs eigarapartar ella lánsbrøv verða handlað á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.
Stk. 9. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting, atkomu til og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1, 3 og 5 í kt-skipan Skráseting Føroya, heruppií hvørjar upplýsingar skulu skrásetast í kt-skipanini."

6. Aftan á § 58 a, men áðrenn yvirskriftina yvir § 59, verður sett:

"**§ 58 b.** Tá eitt kapitalfelag verður stovnað, skulu upplýsingar um felagsins veruligu eigarar, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum, innheintast og skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av felagnum, sbrt. § 9, stk. 1.

§ 58 c. Feløg, sum skulu savna, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, sbrt. § 58 a, skulu eftir áheitan útvega persónum og fyritøkum, sum sbrt. hvítvasklóggávuni

hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, upplýsingar um eigaraviðurskifti felagsins.
Stk. 2. Fær Skráseting Føroya fráboðan sbrt. hvítvasklóggávuni, um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum um felagsins veruligu eigarar, setur Skráseting Føroya eina kanning í verk, sbrt. § 17 og § 58 a, stk. 6, av hesum viðurskiftum. Skráseting Føroya kann mótvegis felagnum áseta eina freist fyri rætting av upplýsingunum.
Stk. 3. Skráseting Føroya kann, samstundis sum kanningin eftir stk. 2 verður gjørd, almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Felagið skal hava møguleika til at mótmæla fráboðanini, áðrenn hon verður almannakunngjørd, uttan so at endamálið við almannakunngering av frágreiðingini um fráboðanina fer fyri skeytið."

7. § 126, stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Fyri at halda fundir á øðrum máli enn føroyskum uttan beinleiðis tulking krevst, at allir nevndarlimir ella eftirlitsráðslimir eru samdir um hetta."

8. § 179, stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Høvuðsleiðslan hevur harumframt ábyrgdina av, at tað, eftir at útbýting, er farin fram, er fulnaður fyri felagskapitalinum og tí tiltakspeningi, sum er bundin sbrt. lóg ella viðtøkum."

9. Í § 224, stk. 2, 1. pkt. verður aftan á "kapitaleigararnir hava" sett: "góðkent".

10. Í § 225, stk. 1 verða aftan á nr. 2 sum nýggj nr. sett:
"3) kapitalfelagið ikki hevur skrásett upplýsingar í kt-skipan Skráseting Føroya, sbrt. § 58,
4) kapitalfelagið ikki hevur skrásett upplýsingar um veruligu eigarar felagsins, ella felagið hevur skrásett ófullfíggjaðar upplýsingar, sbrt. § 58 a,
5) kapitalfelagið ikki hevur goymt skjalprógv um upplýsingarnar um veruligu eigarar felagsins ella felagið hevur goymt ófullfíggjað skjalprógv, sbrt. § 58 a,"
Nr. 3-5 verða eftir hetta nr. 6-8.

11. Í § 225, stk. 1 verður sum nr. 9 sett:
"9) um Skráseting Føroya ikki rættstundis hevur móttikið árligt gjald frá kapitalfelagnum fyri umsiting av reglunum í vinnufelagalógini og teimum reglum, sum ásettar eru við heimild í vinnufelagalógini."

12. § 240, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Verður kapitalurin í framhaldandi partafelagnum hækkaður í sambandi við samanleggingina, ella verður skapað eitt nýtt partafelag sum partur av samanleggingini, skal tað sum liður í samanleggingini fáast til vegar ein frágreiðing frá einum metingarfólki, sbr. tó stk. 2."

13. Yvirskriftin yvir § 277 verður orðað soleiðis:

"*Um at umskapa lutafelag til partafelag*"

14. Í § 278, stk. 1 verður "lutafeagnum" broytt til: "lutafelagnum".

15. Í § 278, stk. 2 verður "sbr. tó § 335, stk. 2 og 3" broytt til: "sbr. tó § 287, stk. 2 og 3".

16. Í § 279, stk. 1, 1 pkt. verður "Høvuðsleiðslan í partafelagnum" broytt til: "Høvuðsleiðslan í lutafelagnum".

17. § 286, stk. 6, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Hesi skjøl skulu, um tey eru gjørd, vera tøk hjá lutaeigarunum á heimstaði felagsins ella á heimasíðu felagsins í seinasta lagi 4 vikur undan, at avgerð um at fremja eina umskipan skal takast uttan so, at lutaeigararnir í semju avgera, at skjølini ikki skulu leggjast fyri lutaeigararnar undan aðalfundinum ella á aðalfundinum, sbr. tó stk. 7:"

18. Í § 286, stk. 6, nr. 2 verður "smápartafelagsins" broytt til: "lutafelagsins".

19. Í § 286, stk. 7 verður "Smápartaeigarar" broytt til: "Lutaeigarar".

20. § 287, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Avgerð um umskapan verður tikin av felagsstovni, sum hevur heimild at broyta viðtøkurnar. Avgerðin verður tikin við tí fleirtali, sum krevst fyri at taka avgerð um at strika felagið, tó í minsta lagi við undirtøku av 4/5 av lutaeigarunum ella atkvøðunum hjá hesum, tá ið atkvøðugreiðsla fer fram við støði í umsetningi ella tílíkum. Er lutafelagið í likvidatión, kann avgerð um umskapan einans takast, um útlutan til lutaeigararnar ikki er byrjað, og um lutaeigararnir samstundis avgera at enda likvidatiónina. § 31 verður at nýta samsvarandi, tá ið eitt lutafelag verður umskapað til eitt partafelag."

21. Í § 287, stk. 2 verður "sbr. § 326, stk. 2" broytt til: "sbr. § 278, stk. 2".

22. Í § 287, stk. 3, nr. 1, verður "smápartafelagsins" broytt til: "lutafelagsins".

23. Í § 287, stk. 3, nr. 2 verður "smápartafelagnum" broytt til: "lutafelagnum".

24. Í § 289, stk. 1, 1. pkt. verður "smápartafelagið" broytt til: "lutafelagið".

25. Í § 289, stk. 3, 1. pkt. verður "Ein umskapan frá smápartafelag" broytt til: "Ein umskapan frá lutafelagi".

26. Í § 289, stk. 3, nr. 1 verður "Smápartaeigararnir" broytt til: "Lutaeigararnir".

27. Í § 289, stk. 3, nr. 3 verður "Treytirnar í § 335, stk. 4" broytt til: "Treytirnar í § 287, stk. 6".

28. Í § 289, stk. 3, nr. 4, 1. pkt. verður "Krøvini hjá smápartaeigarunum" broytt til: "Krøvini í § 287, stk. 6".

29. Í § 289, stk. 4 verður "Umskapanin av einum smápartafelag" broytt til: "Umskapan av einum lutafelag".

30. Í § 319, stk. 1, 1. pkt. verður "§ 58 a, stk. 2 og 3" broytt til: "§ 58 a, stk. 3, 5 og 6".

31. Í § 319, stk. 4 verður "§ 58 a, stk. 5" broytt til: "§ 58 a, stk. 9".

§ 2

Í anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við § 3 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 3 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 2 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 25 frá 16. mars 2012, løgtingslóg nr. 43 frá 6. mai 2016, § 3 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, § 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, § 2 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021 og § 20 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, stk. 3, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Undantikið reglurnar í kapitli 1, 2 og 7 og §§ 15 f-15 h, verður hendan lógin ikki nýtt upp á einstaklingafyritøkur, íognarfeløg og kommanditfeløg."

2. § 15 g verður orðað soleiðis:

"**§ 15 g.** Ein fyritøka, sum er fevnd av hesi lóg, undantikið einstaklingafyritøkur, skal savna upplýsingar um veruligu eigararnar av fyritøkuni, sbr. § 15 h, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
Stk. 2. Ein og hvør, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á fyritøkuni, skal eftir áheitan frá fyritøkuni lata fyritøkuni tær upplýsingar um ognarviðurskiftini, sum eru neyðugar til tess, at fyritøkan kann eyðmerkja veruligu eigararnar, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
Stk. 3. Fyritøkan skal skjótast gjørligt, eftir at fyritøkan er vorðin kunnug við, at ein persónur er blivin veruligur eigari, skráseta upplýsingarnar, heruppií upplýsingar um rættindini hjá teimum veruligu eigarunum, í kt-skipan Skráseting Føroya. Ein og hvør broyting í teimum upplýsingum, sum eru skrásettar um veruligu eigararnar, skal skrásetast skjótast gjørligt eftir, at fyritøkan er vorðin kunnug við broytingina. Teir skrásettu limirnir í dagligu leiðsluni í fyritøkuni, sbr. § 11, stk. 1, skulu roknast og skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya sum veruligir eigarar, um so er, at fyritøkan, eftir at hava troytt allar møguleikar fyri eyðmerking, ongar veruligar eigarar hevur, ella ongar veruligar eigarar kann eyðmerkja.
Stk. 4. Fyritøkan skal í minsta lagi eina ferð um árið kanna, um broytingar skulu gerast í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar. Úrslitið av árligu kanningini skal leggjast fram á fundinum, har høvuðsleiðslan góðkennir ársfrásøgnina, ella líknandi.
Stk. 5. Fyritøkan skal goyma upplýsingarnar um veruligu eigararnar í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Fyritøkan skal harumframt goyma skjalprógv fyri teimum savnaðu upplýsingunum um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
Stk. 6. Fyritøkan skal eftir áheitan lata upplýsingar til Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet um veruligu eigararnar av fyritøkuni, heruppií um royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar í fyritøkuni. Fyritøkan skal harumframt eftir áheitan lata nevndu upplýsingar til aðrar málførar myndugleikar, tá ið hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlitsuppgávum ella umsjónaruppgávum teirra.
Stk. 7. Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet og aðrir málførir myndugleikar kunnu uttan viðurgjald lata upplýsingar víðari um veruligar eigarar, sum eru skrásettar sbrt. stk. 3, ella sum eru savnaðar sbrt. stk. 6, til málførar myndugleikar og eftirlitsmyndugleikar á fíggjarøkinum í ES-limalondum.
Stk. 8. Stk. 1-7 verða ikki nýtt upp á fyritøkur, hvørs eigarapartar ella lánsbrøv verða handlað á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.
Stk. 9. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting, atkomu til og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1, 3 og 5 í kt-skipan Skráseting Føroya, heruppií hvørjar upplýsingar fyritøkan skal skráseta í kt-skipanini."

3. Aftan á § 15 h, men áðrenn yvirskriftina yvir § 16, verður sett:

"§ 15 i. Tá ið ein fyritøka við avmarkaðari ábyrgd, eitt íognarfelag ella eitt kommanditfelag verður stovnað, skulu upplýsingar um veruligu eigararnar í fyritøkuni, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum, savnast og skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av fyritøkuni sbrt. § 10. Hevur fyritøkan við avmarkaðari ábyrgd, íognarfelagið ella kommanditfelagið ongar veruligar eigarar, ella kunnu veruligu eigararnir ikki eyðmerkjast, skal hetta somuleiðis skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av fyritøkuni við avmarkaðari ábyrgd, íognarfelagnum ella kommanditfelagnum.

§ 15. j. Fyritøkur, sum skulu savna, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar sbrt. § 15 g, skulu eftir áheitan útvega persónum og fyritøkum, sum sbrt. hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, upplýsingar um eigaraviðurskiftini í fyritøkuni.
Stk. 2. Fær Skráseting Føroya fráboðan sbrt. hvítvasklóggávuni um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar í fyritøkuni, setur Skráseting Føroya eina kanning í verk sbrt. § 15 g, stk. 5, av hesum viðurskiftum. Skráseting Føroya kann mótvegis fyritøkuni áseta eina freist fyri rætting av upplýsingunum.
Stk. 3. Skráseting Føroya kann samstundis sum kanningin eftir stk. 2 verður gjørd, almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Fyritøkan skal hava møguleika til at mótmæla fráboðanini, áðrenn hon verður almannakunngjørd, uttan so at endamálið við almannakunngering av frágreiðingini um fráboðanina fer fyri skeytið."

4. Í § 21, stk. 1 verða aftan á nr. 2 sum nýggj nr. sett:

"3) virkið ikki hevur skrásett upplýsingar um veruligu eigarar virkisins, ella virkið hevur skrásett ófullfíggjaðar upplýsingar, sbrt. § 15 g,
4) virkið ikki hevur goymt skjalprógv um upplýsingar um veruligu eigarar virkisins, ella virkið hevur goymt ófullfíggjað skjalprógv, sbrt. § 15 g,"

Nr. 3-6 verða eftir hetta nr. 5-8.

5. Í § 23, stk. 1, 1. pkt. verður "§ 15 g, stk. 2 og 3" broytt til: "§ 15 g, stk. 3, 5 og 6".

§ 3

Í anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 4 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 5 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, § 3 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, § 3 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, § 3 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021 og § 20 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 2, nr. 3 verður "§§ 3 og 4" broytt til: "§ 7".

2. § 56 b verður orðað soleiðis:

"**§ 56 b.** Grunnurin skal savna upplýsingar um veruligu eigarar grunsins, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
Stk. 2. Grunsins veruligu eigarar skulu eftir áheitan frá grunninum lata grunninum tær upplýsingar um grunsins veruligu eigarar, heruppií upplýsingar um rættindini hjá veruligu eigarunum, sum grunnurin hevur skyldu til at savna.
Stk. 3. Grunnurin skal skjótast gjørligt eftir, at grunnurin er vorðin kunnugur við, at ein persónur er blivin veruligur eigari, og eftir eina og hvørja broyting

av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar, skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya. Ein og hvør broyting av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar um veruligu eigararnar, skal skrásetast skjótast gjørligt eftir, at grunnurin er blivin kunnugur við broytingina.
Stk. 4. Grunnurin skal í minsta lagi eina ferð um árið kanna, um broytingar skulu gerast í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar. Úrslitið av árligu kanningini skal leggjast fram á fundinum, har nevndin góðkennir ársfrásøgnina, ella líknandi.
Stk. 5. Grunnurin skal goyma upplýsingarnar um veruligu eigarar hansara í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Grunnurin skal harumframt goyma skjalprógv fyri teimum savnaðu upplýsingunum um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
Stk. 6. Grunnurin skal eftir áheitan lata upplýsingar til Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet um grunsins veruligu eigarar, heruppií um royndir at eyðmerkja grunsins veruligu eigarar. Grunnurin skal harumframt eftir áheitan lata nevndu upplýsingar til aðrar málførar myndugleikar, tá ið hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlitsuppgávum ella umsjónaruppgávum teirra.
Stk. 7. Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet og aðrir málførir myndugleikar kunnu uttan viðurgjald lata upplýsingar víðari um veruligar eigarar, sum eru skrásettar sbrt. stk. 3, ella sum eru savnaðar sbrt. stk. 6, til málførar myndugleikar og eftirlitsmyndugleikar á fíggjarøkinum í ES-limalondum.
Stk. 8. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting, atkomu til og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1, 3 og 5 í kt-skipan Skráseting Føroya, heruppií hvørjar upplýsingar grunnurin skal skráseta í kt-skipanini."

3. Aftan á § 56 c, men áðrenn yvirskriftina yvir § 57, verður sett:

"**§ 56 d.** Tá ein vinnurekandi grunnur verður stovnaður, skulu upplýsingar um grunsins veruligu eigarar, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum, innheintast og skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av grunninum sbrt. § 5, stk. 1.

§ 56 e. Grunnar, sum skulu savna, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, sbrt. § 56 b, skulu eftir áheitan útvega persónum og fyritøkum, sum sbrt. hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, upplýsingar um eigaraviðurskifti grunsins.
Stk. 2. Fær Skráseting Føroya fráboðan sbrt. hvítvasklóggávuni, um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum um grunsins veruligu eigarar, setur Skráseting Føroya eina kanning í verk, sbrt. § 57, stk. 3, av hesum viðurskiftum. Skráseting Føroya kann mótvegis grunninum áseta eina freist fyri rætting av upplýsingunum.
Stk. 3. Skráseting Føroya kann, samstundis sum kanningin eftir stk. 2 verður gjørd, almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Grunnurin skal hava møguleika til at mótmæla fráboðanina, áðrenn hon verður almannakunngjørd, uttan so at endamálið við almannakunngering av frágreiðingini um fráboðanina fer fyri skeytið."

4. Í § 63, stk. 2 verður "§ 56 b, stk. 2 og 3" broytt til: "§ 56 b, stk. 3, 5 og 6".

5. Í § 63, stk. 3 verður "§ 56 b, stk. 2 og 3" broytt til: "§ 56 b, stk. 3, 5 og 6".

§ 4

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Yvirskriftin yvir § 17 verður orðað soleiðis:

"*Serstakar reglur fyri sínámillum tryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar viðvíkjandi stovnan o.ø.*"

2. § 17, stk. 3-6 verða strikað, og í staðin verða sett:
"*Stk. 3.* Eitt sínámillum tryggingarfelag og ein tvørgangandi eftirlønargrunnur skulu savna upplýsingar um veruligu eigararnar av sínámillum tryggingarfelagnum og tvørgangandi eftirlønargrunninum, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
Stk. 4. Ein og hvør, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella ræður yvir einum sínámillum tryggingarfelagi ella einum tvørgangandi eftirlønargrunni, skal eftir áheitan frá sínámillum tryggingarfelagnum ella tvørgangandi eftirlønargrunninum lata sínámillum tryggingarfelagnum ella tvørgangandi eftirlønargrunninum tær upplýsingar um eigaraviðurskiftini, ið eru neyðugar til tess, at sínámillum tryggingarfelagið ella tvørgangandi eftirlønargrunnurin kann eyðmerkja veruligu eigararnar, heruppií upplýsingar um rættindini hjá teimum veruligu eigarunum.
Stk. 5. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu skjótast gjørligt eftir, at sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin eru vorðin kunnug við, at ein persónur er blivin veruligur eigari, skráseta upplýsingarnar, heruppií upplýsingar um rættindini hjá teimum veruligu eigarunum, í kt-skipan Skráseting Føroya. Ein og hvør broyting av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar um veruligu eigararnar, skal skrásetast skjótast gjørligt eftir, at felagið ella eftirlønargrunnurin eru vorðin kunnug við broytingina. Teir skrásettu limirnir í stjórnini hjá sínámillum tryggingarfelagnum ella tvørgangandi eftirlønargrunninum eru at meta og skráseta sum veruligir eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya, um so er, at sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin, eftir at hava troytt allar møguleikar fyri eyðmerking, eftir hetta ongar veruligar eigarar hava, ella ongar veruligar eigarar kunnu eyðmerkja.
Stk. 6. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu í minsta lagi eina ferð um árið kanna, um broytingar skulu gerast í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar. Úrslitið av árligu kanningini skal leggjast fram á nevndarfundinum, har nevndin góðkennir ársfrásøgnina.
Stk. 7. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu goyma skjalprógv fyri teimum savnaðu upplýsingunum um tess veruligu eigarar í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu harumframt goyma skjalprógv fyri teimum savnaðu upplýsingunum um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
Stk. 8. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu eftir áheitan lata upplýsingar til Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet um veruligu eigarar sínámillum tryggingarfelagsins og tvørgangandi eftirlønargrunsins, heruppií um royndir

hjá sínámillum tryggingarfelagnum og tvørgangandi eftirlønargrunninum at eyðmerkja tess veruligu eigarar. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu harumframt eftir áheitan lata øðrum málførum myndugleikum nevndu upplýsingar, um hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri at røkja eftirlitsuppgávur ella umsjónaruppgávur teirra.
Stk. 9. Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet og aðrir málførir myndugleikar kunnu uttan viðurgjald lata upplýsingar víðari um veruligar eigarar, sum eru skrásettar sbrt. stk. 5, ella sum eru savnaðar sbrt. stk. 8, til málførar myndugleikar og eftirlitsmyndugleikar á fíggjarøkinum í ES-limalondum.
Stk. 10. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting, atkomu til og kunngering av upplýsingum eftir stk. 3, 5 og 7 í kt-skipan Skráseting Føroya, heruppií hvørjar upplýsingar sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya."

3. Aftan á § 17 verður í kapittul 3 sett:

"**§ 17 a.** Eitt sínámillum tryggingarfelag og ein tvørgangandi eftirlønargrunnur, sum skulu savna, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, sbrt. § 17, skulu eftir áheitan útvega persónum og fyritøkum, sum sbrt. hvítvasklógini hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, upplýsingar um síni eigaraviðurskifti.
Stk. 2. Fær Tryggingareftirlitið fráboðan sbrt. hvítvasklógini um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar av einum sínámillum tryggingarfelagi og einum tvørgangandi eftirlønargrunni, setur Tryggingareftirlitið eina kanning í verk av hesum viðurskiftum. Tryggingareftirlitið kann mótvegis sínámillum tryggingarfelagnum ella tvørgangandi eftirlønargrunninum áseta eina freist fyri rætting av upplýsingunum.
Stk. 3. Eftir áheitan frá Tryggingareftirlitinum kann Skráseting Føroya, samstundis sum kanningin sbrt. stk. 2 verður gjørd, almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Sínámillum tryggingarfelagið ella tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu hava møguleika til at mótmæla fráboðanini, áðrenn hon verður almannakunngjørd, uttan so at endamálið við almannakunngering av frágreiðingini um fráboðanina fer fyri skeytið."

4. Í § 215, stk. 2 verður "§ 17, stk. 4 og 5" broytt til: "§ 17, stk. 5, 7 og 8".

§ 5

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. mai 2024.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær § 2, nr. 1 kemur í gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Skotið verður upp at dagføra reglurnar um skráseting av eigaraviðurskiftum í vinnufeløgum, vinnufyritøkum (einstaklingafyritøkur undantiknar), vinnurekandi grunnum, sínámillum tryggingarfeløgum og tvørgangandi eftirlønargrunnum samsvarandi 5. hvítvaskdirektivinum hjá ES.

5. hvítvaskdirektivið hjá ES ber við sær broytingar í mun til ásetingarnar í grein 30 í 4. hvítvaskdirektivinum hjá ES, sum snýr seg um skráseting av upplýsingum um veruligu eigararnar í feløgum og løgfrøðiligum eindum. Broytingarnar í direktivinum hjá ES vórðu gjørdar eftir tilmæli frá Financial Action Task Force (FATF) og Global Forum, har víst varð á tørvin á at seta í gildi neyvari reglur um skráseting av upplýsingum um veruligu eigararnar í feløgum og løgfrøðiligum eindum. Í Danmark vórðu hesar broytingarnar settar í gildi við uppskotunum til lov nr. 676 frá 29. mai 2018 og lov nr. 554 frá 7. mars 2019, og eru hesi lógaruppskotini nýtt sum fyrimynd fyri hesum uppskoti.

Tað verður mett týdningarmikið, at lógarverkið á vinnufelaga- og hvítvaskøkinum í Føroyum til eina og hvørja tíð tryggjar gjøgnumskygni á hædd við lógarverkið í ES. Lógaruppskotið skal tískil eisini lesast í samanhangi við teimum broytingum, sum vórðu gjørdar í hvítvasklóggávuni á vári 2023 við løgtingslóg nr. 69 frá 22. mai 2023 um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, og við anordning nr. 922 af 26. juni 2023 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme.

Eisini verður skotið upp at broyta løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógina) soleiðis, at Skráseting Føroya fær heimild til at heita á skiftirættin um at avtaka feløg, sum ikki rættstundis gjalda árliga gjaldið eftir reglunum, sum eru ásettar við heimild í § 12, stk. 4 í vinnufelagalógini. Royndirnar hjá Skráseting Føroya eru, at tá kapitalfeløg ikki rættstundis gjalda árliga gjaldið, er tað fyrisitingarliga krevjandi og ofta trupult at fáa ársgjaldið inngoldið.

Nakrar málsligar og ritstjórnarligar broytingar verða eisini gjørdar í vinnufelagalógini, t.e. broytingarnar í § 1, nr. 1-3, 7-9 og 12-29.

1.2. Galdandi lóggáva

Við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019[1] varð álagt øllum kapitalfeløgum, vinnufyritøkum (einstaklingafyritøkur undantiknar), vinnurekandi grunnum, sínámillum tryggingarfeløgum og tvørgangandi eftirlønargrunnum at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum, skjótast gjørligt eftir at felagið, fyritøkan, vinnurekandi grunnurin, sínámillum tryggingarfelagið ella tvørgangandi eftirlønargrunnurin hevur fingið fráboðan um, at ein persónur er blivin veruligur eigari, ella at ein broyting er gjørd í skrásettu eigaraupplýsingunum.

[1] Løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Nærri reglur viðvíkjandi skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar eru ásettar í kunngerð, sum varð sett í gildi 19. januar 2022[2]. Í hesum sambandi fingu feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir boð um at skráseta sínar eigarar á fráboðanarskjal, sum skuldi latast Skráseting Føroya í seinasta lagi 1. september 2022. Av teimum gott og væl 4000 kapitalfeløgunum og øðrum løgfrøðiligum eindum, sum eru skrásettar í kt-skipan Skráseting Føroya, hava umleið 100 feløg og løgfrøðiligar eindir enn ikki skrásett upplýsingar um veruligu eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Sambært § 225, stk. 1, í galdandi vinnufelagalóg og § 21, stk. 1, í vinnufyritøkulógini, kann Skráseting Føroya heita á skiftirættin um at avtaka feløg, um staðfest verður, at eitt ella fleiri av teimum viðurskiftum, ið nevnd eru í § 225, stk. 1, nr. 1-5 ella § 21, stk. 1, nr. 1-6, gera seg galdandi, til dømis at felagið/fyritøkan ikki hevur ta leiðslu ella tann heimstað, ið eru fyriskrivað í lógini ella í viðtøkunum. Áðrenn felagið ella fyritøkan verður send skiftirættinum til tvingsilsavtøku, sendir Skráseting Føroya eina áminning við freist at fáa viðurskiftini í rættlag, sbrt. § 225, stk. 2, í vinnufelagalógini ella § 21, stk. 2, í vinnufyritøkulógini.

Sambært galdandi løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg, (vinnufelagalógin), anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (vinnufyritøkulógin), anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde (vinnugrunnalógin) og løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi (tryggingarlógin) kunnu feløg og løgfrøðiligar eindir, sum hava framt brot á ásetingarnar um skráseting, varðveitslu og at lata víðari upplýsingar um veruligu eigararnar, revsast við bót. Harafturímóti hevur Skráseting Føroya ikki heimild til at heita á skiftirættin um at avtaka feløg ella aðrar løgfrøðiligar eindir, sum eftir at hava fingið eina áminning við freist at fáa viðurskiftini í rættlag, kortini lata vera við at skráseta upplýsingar um løgligu ella veruligu eigararnar.

Hóast tað kunnu vera serlig tilfelli, har tað er neyðugt við heimild til at revsa feløg og løgfrøðiligar eindir við bót fyri brot á skyldurnar, so er tað metingin hjá Skráseting Føroya, at møguleikin fyri at avtaka feløg og fyritøkur, í flestu førum vil vera eitt hóskandi amboð til tess at tryggja, at skyldurnar viðvíkjandi eigaraupplýsingum verða tiknar í álvara.

Tað er ikki í galdandi lóggávu ásett sum treyt í samband við stovnan av feløgum og fyritøkum, at upplýsingar um løgligu og veruligu eigarar skulu latast Skráseting Føroya samstundis sum onnur stovningarskjøl. Tað kann tí vera torført at fáa eigaraupplýsingar inn yvirhøvur, tá tað ikki er ein treyt, at eigaraupplýsingarnar skulu latast inn í samband við skráseting av nýggjum feløgum og fyritøkum.

Í Føroyum verður størsti parturin av umsitingini av vinnufelagalógini fíggjaður við brúkaragjøldum, undir hesum ársgjaldi, sum øll kapitalfeløg hava skyldu til at rinda sambært kunngerð nr. 144 frá 23. oktober 2018[3]. Um eitt felag ikki rindar ársgjald, hevur mannagongdin hjá Skráseting Føroya higartil verið, at Skráseting Føroya sendir upp til tvey áminningargjøld við posti á kr. 100,00, og síðani ringir ella skrivar ein teldupost við áminning.

[2] Kunngerð nr. 5 frá 19. januar 2022 um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skráseting Føroya

[3] Kunngerð nr. 144 frá 23. oktober 2018 um fráboðan, skráseting og almannakunngering o.a. hjá Skráseting Føroya.

Um felagið ikki letur við seg koma, so noyðist Skráseting Føroya at heita á advokat um at innheinta kravið, tí ongin heimild er til at lata kravið innheinta umvegis TAKS. Í teimum førum, har feløg, hóast áminning, ikki lata við seg koma, eru royndirnar hjá Skráseting Føroya tær, at tað er fyrisitingarliga krevjandi, kostnaðarmikið og ofta trupult at fáa ársgjaldið inngoldið.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at dagføra reglurnar um innheinting, skráseting, varðveitslu og at lata víðari upplýsingar um veruligu eigararnar í feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum samsvarandi 5. hvítvaskdirektivinum hjá ES. Hetta verður gjørt til tess at tryggja, at upplýsingarnar eru atkomuligar hjá almennum myndugleikum, t.d. eftirlitsmyndugleikum á fíggjar- og skattaøkinum, og hjá fyritøkum og persónum, sum eftir hvítvasklóggávuni eru fevnd av kravinum um at "kenna sín kunda".

Uppskotið hevur eisini til endamáls at lætta um umsitingarligu byrðarnar, ið standast av at uppkrevja ársgjøld frá feløgum. Skotið verður upp, at Skráseting Føroya fær heimild til at heita á skiftirættin um at avtaka feløg, sum - hóast áminning - ikki rættstundis rinda ársgjald til Skráseting Føroya.

Dagføring av ásetingunum um skráseting av veruligum eigarum
Sambært galdandi § 58 og § 58 a, stk. 2, í vinnufelagalógini og § 15 g, stk. 2, í vinnufyritøkulógini skulu feløg og fyritøkur skjótast gjørligt, eftir at felagið ella fyritøkan hevur fingið fráboðan um, at farið er upp um markvirðini í § 55 í vinnufelagalógini, ella at ein persónur er blivin veruligur eigari í felagnum ella fyritøkuni, skráseta upplýsingarnar.

Skotið verður upp, at § 58, stk. 1, í vinnufelagalógini verður broytt, at nýggj § 58 b verður sett inn í vinnufelagalógina, og at ein nýggj § 15 i verður sett inn í vinnufyritøkulógina, soleiðis at upplýsingar um løgligu og veruligu eigararnar skulu skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av felagnum ella fyritøkuni. Skotið verður somuleiðis upp, at nýggj § 56 d verður sett inn í vinnugrunnalógina, soleiðis at stovnan av nýggjum vinnugrunnum verður treytað av, at upplýsingar um veruligu eigararnar verða skrásettar í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av grunninum.

Umframt galdandi krav um, at allar broytingar í skrásetingini um veruligu eigararnar, skulu skrásetast skjótast gjørligt, eftir at løgfrøðiliga eindin er vorðin kunnug við broytingina, er tað ynskiligt, at áløgd verður feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum ein greið skylda at dagføra upplýsingar um veruligu eigararnar, og at hesi í minsta lagi eina ferð árliga skulu kanna, um broytingar eru í teimum skrásettu upplýsingum.

Skotið verður tískil upp, at § 58 a í vinnufelagalógini, § 15 g í vinnufyritøkulógini, § 56 b í vinnugrunnalógini og § 17 í tryggingarlógini verða umorðaðar, soleiðis at feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir, ið eru fevnd av hesum uppskoti, í minsta lagi eina ferð um árið skulu kanna, um broytingar eru í teimum skrásettu upplýsingum um veruligu eigararnar. Úrslitið av hesi árligu kanning skal síðani leggjast fram á fundinum, har høvuðsleiðslan góðkennir ársfrásøgnina ella líknandi.

Skotið verður eisini upp, at Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet fær heimild at lata víðari upplýsingar um veruligu eigararnar til málførar myndugleikar og eftirlitsmyndugleikar á fíggjarøkinum, sonevnd *"Financial Intelligence Units"* (FIU), í ES-

limalondum. Tær upplýsingar, sum sambært uppskotinum kunnu latast víðari, eru upplýsingar um veruligu eigararnar, sum Skráseting Føroya letur skráseta í sínari KT-skipan, men sum ikki verða lagdar fram alment, til dømis p-tal, samleikaprógv, avrit av passi ella øðrum skjølum.

Sambært §§ 9-20 í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski og fígging av yvirgangi, og sambært § 10-21 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af hvidvaskloven, hava peningastovnar, tryggingarfeløg, advokatar, grannskoðarar, ognarmeklarar og onnur skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, eitt nú tá ið eitt kundasamband verður stovnað, ella tá ið transaktiónir verða framdar, sum eru omanfyri ávís støddarmørk.

Galdandi hvítvasklóggáva ásetir, at fyritøkur og persónar, sum eru fevndir av hvítvasklóggávuni hava fráboðanarskyldu mótvegis Skráseting Føroya, um staðfest verður ósamsvar í fráboðaðu upplýsingunum um veruligu eigararnar. Hóast fráboðanarskylduna er tað í dag ongin áseting sum tryggjar, at feløg og løgfrøðiligar eindir eftir áheitan skulu lata upplýsingar um veruligu eigararnar víðari til fyritøkur og persónar, sum sambært hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir.

Skotið verður tí upp, at tað í vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini, vinnugrunnalógini og tryggingarlógini verður álagt feløgum, fyritøkum, vinnurekandi grunnum, sínámillum tryggingarfeløgum og tvørgangandi eftirlønargrunnum eftir áheitan at útflýggja upplýsingar um veruligu eigararnar til fyritøkur og persónar, sum sambært hvítvasklóggávuni skulu gera kundakunnleikamannagongdir.

Heimild at senda feløg og fyritøkur til tvingsilsavtøku
Til tess at tryggja, at skyldurnar viðvíkjandi eigaraupplýsingum og ársgjaldi til Skráseting Føroya verða tiknar í álvara, verður skotið upp, at ásetingin í § 225, stk. 1, í vinnufelagalógini og § 21, stk. 1, í vinnufyritøkulógini verða víðkaðar, soleiðis at Skráseting Føroya fær heimild til at taka stig til at avtaka feløg og fyritøkur umvegis skriftirættin, um so er, at felagið ella fyritøkan ikki heldur skyldur sínar í samband við innheintan, skráseting og varðveitslu av upplýsingunum um veruligu eigararnar, ella um felagið ikki rættstundis rindar ársgjald til Skráseting Føroya.

Tvingsilsavtøka er uttan iva eitt stórt inntriv í viðurskiftini hjá feløgum og fyritøkum. Samstundis er tvingsilsavtøka eitt egnað og neyðugt amboð, sum tryggjar, at feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir rætta inn sambært boðum frá Skráseting Føroya, tá ið myndugleikin staðfestir, at felagið ella løgfrøðiliga eindin ikki livir upp til lógarásettu krøvini. Lagt verður somuleiðis upp til, at tvingsilsavtøka av feløgum og fyritøkum sum meginregla einans verður troytt, eftir at felagið ella fyritøkan hevur fingið eina áminning, við freist til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Viðvíkjandi uppskotnu heimildini at senda feløg til tvingsilsavtøku fyri manglandi ársgjald, verður harumframt lagt upp til, at Skráseting Føroya, áðrenn freistin sambært § 225, stk. 2, verður ásett, sendir felagnum eina vanliga áminning við gjaldsfreist.

Um so er, at eitt felag ella ein fyritøka ikki hevur latið við seg koma, og tískil er sent í skiftirættin til tvingsilsavtøku, so ber framvegis til at heita á Skráseting Føroya um uppafturtøku innan 3 mánaðir eftir, at heitt varð á skiftirættin um at avtaka felagið, sambært §§ 231-232 í vinnufelagalógini.

Ásetingarnar um tvingsilsavtøku fevna bæði um verandi og nýstovnað feløg og fyritøkur, heruppií tey feløg og tær fyritøkur, sum enn ikki hava skrásett upplýsingar um veruligu eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya. Havandi mannagongdina hjá Skráseting Føroya í huga, verður gingið út frá, at flestu feløg og løgfrøðiligu eindir eftir gildiskomu av hesum uppskoti fara at fáa viðurskiftini í rættlag, antin av sær sjálvum, ella við vegleiðing frá Skráseting Føroya.

Viðvíkjandi tvingsilsavtøku av fyritøkum sambært vinnufyritøkulógini skal havast í huga, at hóast allar fyritøkur (einstaklingafyritøkur undantiknar) hava skyldu til at innheinta og skráseta upplýsingar um veruligu eigararnar, so eru tað bert skrásettar fyritøkur, ið kunnu tvingsilsavtakast. Skrásetingarskyldugar fyritøkur eru lutafeløg og foreiningar við avmarkaðari ábyrgd, umframt íognarfeløg og kommanditfeløg, har allir íognararnir ávikavist komplementararnir eru kapitalfeløg.

Lógaruppskotið inniheldur ikki uppskot til reglur um tvingilsavtøku av vinnurekandi grunnum. Orsøkin til hetta er, at § 50 í vinnugrunnalógini heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um avtøku og tvingsilsavtøku av vinnurekandi grunnum. Nærri reglur um hetta eru ásettar í *bekendtgørelse nr. 1386 frá 11. december 2007 for Færøerne om opløsning af erhvervsdrivende fonde (likvidation, konkurs, tvangsopløsning og fusion)*. Lagt verður upp til, at reglur um tvingsilsavtøku av vinnurekandi grunnum vegna manglandi ella mangulfullar eigaraupplýsingar verða ásettar í hesi kunngerð.

Sambært galdandi vinnufelagalóg, vinnufyritøkulóg, vinnugrunnalóg og tryggingarlóg kunnu feløg, fyritøkur, sínámillum tryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar, sum ikki hava hildið skyldur sínar viðvíkjandi innheintan, skráseting, varðveitslu og at lata víðari upplýsingar um veruligu eigararnar, revsast við bót.

Uppskotið inniheldur nakrar fylgibroytingar í revsiásetingunum í vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini, vinnugrunnalógini og tryggingarlógini. Ítøkiligu broytingarnar áleggja ikki revsing fyri brot á tær skyldur, sum í lógaruppskotinum verða lagdar afturat galdandi skyldum, men føra víðari galdandi revsiheimildir.

Í sambandi við dagføringina av vinnufelagalógini eru nakrar málsligar og ritstjórnarligar broytingar gjørdar í § 1, nr. 1-4, 7-9 og 12-29 í uppskotinum. Uppskotnu ritstjórnarligu broytingarnar eru gjørdar samsvarandi galdandi ásetingum í donsku selskabsloven. Serligt um uppskotnu broytingarnar í § 1, nr. 14-29 skal viðmerkjast, at talan er um broytingar í brotinum í kapitli 16 um umskapan av partafelagi til lutafelag. Av røttum eigur hesin parturin av kapitli 16 í vinnufelagalógini at snúgva seg um umskapan av lutafeløgum til partafeløg.

Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar til uppskotnu broytingarnar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður tað álagt feløgum, fyritøkum (einstaklingafyritøkur undantiknar) og vinnurekandi grunnum at skráseta upplýsingar um løgligu og veruligu eigararnar í seinasta lagi samstundis við skráseting av felagnum, fyritøkuni ella vinnurekandi grunninum. Harumframt verður tað álagt feløgum, fyritøkum, vinnurekandi grunnum, tryggingarfeløgum og tvørgangandi eftirlønargrunnum at taka støðu til spurningin um eigaraviðurskiftini í minsta lagi eina ferð um árið, og at útflýggja upplýsingar um eigaraviðurskiftini til persónar og fyritøkur, sum sambært hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, eftir áheitan.

Heimildirnar hjá Skráseting Føroya at heita á skiftirættin um at avtaka feløg og fyritøkur, verða víðkaðar til eisini at fevna um:

- Feløg, sum ikki hava skrásett upplýsingar sambært § 58 í vinnufelagalógini, sbr. § 225, stk. 1, nr. 3, í vinnufelagalógini
- Feløg og fyritøkur, sum ikki hava skrásett upplýsingar um veruligu eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya, ella sum hava skrásett ófullkomnar upplýsingar, sbrt. § 58 a, sbr. § 225, stk. 1, nr. 4, í vinnufelagalógini og § 15 g, sbr. § 21, stk. 1, nr. 3, í vinnufyritøkulógini
- Feløg og fyritøkur, sum ikki hava goymt skjalprógv um upplýsingarnar um veruligu eigararnar, ella um felagið/fyritøkan hevur goymt ófullkomið skjalprógv, sbrt. § 58a, sbr. § 225, stk. 1, nr. 5, í vinnufelagalógini sbrt. § 15 g, sbr. § 21, nr. 4, í vinnufelagalógini
- Feløg sambært vinnufelagalógini, sum ikki rættstundis hava goldið ársgjald til Skráseting Føroya, sambært § 12, stk. 4, sbr. § 225, stk. 1, nr. 9, í vinnufelagalógini

Nakrar málsligar og ritstjórnarligar broytingar eru gjørdar í vinnufelagalógini. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 1-3, 7-9 og 12-29.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er sent til ummælis hjá hesum pørtum:

Vinnuhúsinum, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Advokatfelag Føroya, Felagnum Peningastovnar, Trygd, Betri Trygging, Lív, Betri Pensjón, Eftirlønargrunni Løntakaranna, Løgmálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, TAKS, Dátueftirlitinum, Føroya Rætti og Føroya Landfúta.

Uppskotið hevur ligið frammi á heimasíðu Uttanríkis- og vinnumálaráðsins.

Viðmerkingar komu frá Føroya Arbeiðsgevarafelag (fylgiskjal 4), Felagnum Føroyskir Grannskoðarar (fylgiskjal 5), Fíggjarmálaráðnum (fylgiskjal 6), TAKS (fylgiskjal 7) og Føroya Landfúta (fylgiskjal 8).

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur viðgjørt innkomnu viðmerkingarnar í hoyringarnotati, sum er viðlagt uppskotinum sum fylgiskjal 2.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri land ella kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Við uppskotinum verður tað umsitingarliga minni krevjandi fyri Skráseting Føroya at hava eftirlit við upplýsingum um veruligar eigarar í feløgum, og at umsita áminningar og innheintingar av ársgjøldum.

Uppskotið verður ikki mett at leggja aðrar størri umsitingarligar byrðar á Skráseting Føroya ella aðrar almennar stovnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið ber við sær nakrar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna við tað, at álagt verður feløgum, fyritøkum, vinnurekandi grunnum, sínámillum tryggingarfeløgum og tvørgangandi eftirlønargrunnum at taka støðu til spurningin um eigaraviðurskiftini í minsta lagi eina ferð um árið, og at útflýggja upplýsingar um eigaraviðurskiftini til persónar og fyritøkur, sum sambært hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir.

Kravið um, at støða skal takast til spurningin um eigaraviðurskiftini í minsta lagi eina ferð um árið, verður ikki mett at bera við sær stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Tað er ikki vanligt, at broytingar í eigaraviðurskiftum í feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum koma fyri á hvørjum ári, og tá ið broytingar koma fyri, ið bera við sær, at farið verður upp um markvirðini í § 55, stk. 1, í vinnufelagalógini, skal hetta longu sambært galdandi lóg fráboðast felagnum ella fyritøkuni skjótast gjørligt.

Viðvíkjandi vinnurekandi grunnum og eftirlønargrunnum er tað so, at hesar løgfrøðiligu eindir vanliga ikki hava veruligar eigarar, og verður nevndin tískil sett inn sum veruligur eigari. Hetta merkir, at ein nevndarbroyting eisini er ein broyting í eigaraviðurskiftunum, sum kann og skal skrásetast skjótast gjørligt.

Viðvíkjandi kravinum um, at feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir frameftir skulu útflýggja upplýsingar um løgligu og veruligu eigararnar til persónar og fyritøkur, sum sambært hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, skal havast í huga, at hetta fyrst og fremst verður viðkomandi í samband við, at felagið ella løgfrøðiliga eindin sjálv hevur umbiðið eina tænastu frá einari fyritøku ella persóni, sum er fevndur av hvítvasklóggávuni, til dømis frá einum peningastovni, tryggingarfelagi, advokati, grannskoðara, ognarmeklara ella øðrum.

Fyritøkur og persónar, sum eru fevndir av hvítvasklóggávuni, kunnu sum meginregla ikki stovna eitt handilssamband við ein kunda, ella gera eina einstaka transaktión yvir ásettu markvirðini, uttan fyrst at gera kundakunnleikamannagongdir. Tað fylgir longu av galdandi hvítvasklóggávu, at um so er, at felagið ella løgfrøðiliga eindin ikki er sinnað at útflýggja upplýsingarnar til fyritøkuna ella persónin í samband við eina kundakunnleikamannagongd, til dømis avrit av eigarabókini, so kann kundasamband vanliga ikki stovnast ella halda á fram, og má felagið ella løgfrøðiliga eindin sostatt vera tænastuna fyri uttan.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar við sær.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran kendan millumtjóðasáttmála á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran kendan tvørgangandi millumtjóðasáttmála á økinum.

1) Hoyvíkssáttmálin
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Sambært galdandi vinnufelagalóg, vinnufyritøkulóg, vinnugrunnalóg og tryggingarlóg kunnu feløg og løgfrøðiligar eindir, sum hava framt brot á ásetingarnar um skráseting, varðveitslu og at lata víðari upplýsingar um veruligu eigararnar, revsast við bót. Revsiásetingarnar hava sín uppruna í, at 4. hvítvaskdirektivið hjá ES krevur, at ES-limalondini tryggja, at feløg og løgfrøðiligar eindir kunnu ábyrgjast fyri brot á nationalu ásetingarnar, soleiðis at endamálið við direktivinum verður rokkið mest effektivt.

Broytingin í revsireglunum í vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini, vinnugrunnalógini og tryggingarlógini er ein fylgibroyting. Lógaruppskotið áleggur ikki revsing fyri brot á tær skyldur, sum verða lagdar afturat verandi skyldum, men førir víðari galdandi revsiheimildir. Hetta skal síggjast í tí ljósi, at tað frameftir ikki verður møguligt at stovna feløg, fyritøkur ella vinnugrunnar, uttan at skráseta veruligu eigararnar í seinasta lagi samstundis, og at brot á skyldurnar viðvíkjandi veruligu eigarunum frameftir fer at bera við sær, at felagið ella løgfrøðiliga eindin fær boð frá Skráseting Føroya um at fáa viðurskiftini í rættlag, í aðru syftu at heitt verður á skiftirættin um at avtaka felagið ella løgfrøðiligu eindina.

Viðvíkjandi uppskotnu heimildini at heita á skiftirættin um at avtaka feløg ella løgfrøðiligar eindir, verður víst til brot 1.3, 1.4. og 2.14 í lógaruppskotinum.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið áleggur, broytir ella avtekur ikki nakran skatt ella nakað avgjald.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum persónum skyldur.

Viðvíkjandi løgfrøðiligum persónum verður víst til pkt. 2.3 í lógaruppskotinum "Avleiðingar fyri vinnuna".

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Heimildirnar hjá Skráseting Føroya at heita á skiftirættin um at avtaka feløg ella aðrar løgfrøðiligar eindir verða víðkaðar til eisini at fevna um feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir, ið ikki halda skyldur sínar viðvíkjandi innheinting, skráseting og varðveitslu av upplýsingum um veruligu eigararnar. Eisini verður skotið upp, at Skráseting Føroya fær heimild til at heita á skiftirættin um at avtaka feløg, sum ikki rættstundis rinda Skráseting Føroya ársgjald sambært vinnufelagalógini.

Heimildin at heita á skiftirættin um at avtaka feløg ella fyritøkur fevnir bæði um verandi og nýstovnað feløg og fyritøkur (einstaklingafyritøkur undantiknar), heruppií tey feløg, sum enn ikki hava skrásett upplýsingar um veruligu eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Avtøka av feløgum og fyritøkum verður tó ikki sett í verk, fyrr enn felagið ella fyritøkan hevur fingið eina áminning við freist til at fáa viðurskiftini í rættlag. Lógaruppskotið heimilar ikki avtøku av vinnurekandi grunnum, tí mett verður, at slíkar ásetingar eiga at verða ásettar fyri seg í kunngerð, sbrt. § 50 í vinnugrunnalógini.

Skráseting Føroya fær heimild til at almannakunngera úrslitið av kanningum av upplýsingunum um veruligu eigararnar í feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum, tá ið kanningin er sett í verk, orsakað av eini fráboðan sambært hvítvasklóggávuni um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar.

Viðvíkur fráboðanin einum sínámillum tryggingarfelag ella einum tvørgangandi eftirlønargrunni, so er tað Tryggingareftirlitið, ið skal seta kanningina í verk.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna

Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1
Ásetingin í galdandi § 7 c, stk. 1-2, í vinnufelagalógini ger tað møguligt at víkja frá kravinum um undirskrift á skjøl, sum onnur enn Skráseting Føroya hevur givið út, soleiðis at til dømis høvuðsleiðslan og grannskoðarin kunnu skriva undir talgilt.

Skotið verður upp, at ein rætting verður gjørd í § 7 c, stk. 2, 2. pkt., í galdandi vinnufelagalóg, soleiðis at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur um, at víkjast kann *ikki* frá kravinum um undirskrift fyri ávís sløg av skjølum, eins og í § 5 c, stk. 2, í vinnufyritøkulógini. Hetta kann til dømis vera viðkomandi í teimum førum, har tað er neyðugt at leggja fram skjøl í upprunalíki, við uppruna undirskriftum, til dømis skjøl, sum skulu sendast myndugleikum í øðrum londum.

Til nr. 2
Málslig rætting.

Til nr. 3
Sambært § 55, stk. 2, í vinnufelagalógini skulu kapitalpartar, hvørs atkvøðurættur er hjá einum virki, sum viðkomandi hevur ræði á gjøgnum tað samband, sum nevnt er í § 7 í vinnufelagalógini, og kapitalpartar, sum viðkomandi hevur veitt sum trygd, sum meginregla takast við í metingini sambært § 55, stk. 1, í vinnufelagalógini.

Mett verður, at orðingin "*verða roknaðir*" í galdandi § 55, stk. 2 er ógreið. Skotið verður tískil upp, at orðingin verður broytt til "*verða roknaðir uppí*", soleiðis at tað verður gjørt greitt, at metingin sambært § 55, stk. 2 skal nýtast í teimum førum, har tað ikki frammanundan er staðfest, at persónurin hevur ræði á kapitalpørtum sambært § 55, stk. 1, nr. 1 ella 2.
Til nr. 4
Sambært § 58, stk. 1, í galdandi vinnufelagalóg hava feløg skyldu til at skráseta týðandi kapitalpartar "*skjótast til ber*" eftir, at felagið hevur fingið fráboðan um, at eigarar eru, sum hava ræði á týðandi kapitalpørtum.

Skotið verður upp, at § 58, stk. 1, í vinnufelagalógini verður broytt, soleiðis at tað frameftir verður ásett sum ein treyt fyri skráseting (stovnan) av feløgum, at kapitaleigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpørtum sbr. § 55, stk. 1, í vinnufelagalógini, skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av felagnum.

Tær upplýsingar, sum skulu skrásetast, eru upplýsingar um eigarar, sum eiga í minsta lagi 5% av felagskapitalinum, ella sum hava ræði á í minsta lagi 5% av atkvøðurættinum sambært § 55, stk. 1, 1. pkt., í vinnufelagalógini. Eru ongir eigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpørtum, so skal hetta somuleiðis skrásetast, sambært § 58, stk. 1, 2. pkt., í uppskotinum.

Sambært § 55, stk. 2, í galdandi vinnufelagalóg skulu sum havandi ræði á kapitalpørtum eisini roknast onnur sløg av ræðisrættindum, til dømis tað, at atkvøðurætturin hjá

kapitalpørtunum liggur hjá einum øðrum felagið ella persóni, ella upplýsingar um, at ein veðhavari hevur fingið trygd í kapitalpørtum íroknað atkvøðurættinum, um veðhavarin hevur boðað frá, at hann ætlar sær at nýta atkvøðurættin. Slík serlig rættindi skulu eisini skrásetast í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av felagnum, sbrt. uppskotnu § 58.

Orðingin "*skjótast gjørligt*" í uppskotnu § 58, stk. 2, letur tað vera upp til eina ítøkiliga meting, hvussu leingi felagið kann bíða við at skráseta broytingar í skrásettu upplýsingunum um løgligu eigararnar, sambært § 55, stk. 1-2. Tó kann felagið ikki uttan heilt serliga grund bíða fleiri dagar við at skráseta broytingarnar.

Landsstýrismaðurin kann sambært § 55, stk. 3, í vinnufelagalógini áseta nærri reglur um partabrøv, ið verða handlað á einum reguleraðum marknaði ella multilateralum handilsfasiliteti, og kunnu hesar reglur víkja frá ásetingini í § 55, stk. 1. Uppskotið hevur ikki til endamáls at broyta rættarstøðuna hesum viðvíkjandi.

Til nr. 5

Galdandi § 58 a, stk. 1, í vinnufelagalógini áleggur feløgum at savna upplýsingar um veruligu eigarar felagsins, heruppií rættindi hjá teimum veruligu eigarunum. Kravið um at hava kunnleika til veruligar eigarar hevur samband við kravið í hvítvasklóggávuni um, at persónar og fyritøkur, sum eru fevnd av lógini, skulu fáa greiðu á eigara- og ræðisbygnaðinum og eyðmerkja veruligu eigararnar. Tískil er álagt feløgum skylda til at eyðmerkja veruligu eigararnar og til at seta í verk neyðug tiltøk, til tess at staðfesta samleikan hjá veruligu eigarunum. Feløg skulu harumframt kunna skjalprógva, hvussu felagið hevur staðfest samleikan hjá veruligu eigarunum.

Hugtakið "*veruligur eigari*" merkir sambært § 5, stk. 1, nr. 30, í galdandi vinnufelagalóg ein ella fleiri fysiskir persónar, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis eiga ella hava ræði á nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, ella sum á annan hátt hava ræði á felagnum.

Sum veruligur eigari verða í útgangsstøðinum roknaðir teir fysisku persónar, sum hava ræði á meira enn 25% av kapitalpørtunum ella atkvøðurættinum í einum felagi. Tó er tað ikki útilokað, at aðrir fysiskir persónar skulu skrásetast sum veruligir eigarar, um teir til dømis við støði í avtalu hava faktiska ræðið á eigarapørtunum ella atkvøðurættinum. Um so er, at ein fysiskur persónur hevur ræði á eigarapørtum ella atkvøðurættinum, sum ein annar fysiskur persónur eigur, skulu báðir persónar skrásetast sum veruligir eigarar. Er talan hinvegin um, at ein løgfrøðiligur persónur eigur eigarapartar ella hevur ræði á eigarapørtum ella atkvøðurættindum í einum felagi, so eru tað sum meginregla fysisku persónarnir aftanfyri, ið skulu skrásetast sum veruligir eigarar.

Um ein fysiskur persónur eigur meira enn 25 prosent av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, og eru eigarapartarnir ella atkvøðurætturin avhendaðir til ein annan fysiskan persón, til dømis sum trygd fyri panti ella líknandi, skulu báðir fysisku persónarnir metast sum veruligir eigarar.

Tað er uttan týdning, hvørt talan er um beinleiðis ella óbeinleiðis eigaraskap, tí upplýsingar skulu fáast til vegar um persónar, sum standa aftanfyri. Tað er tað samlaða ognarhaldið ella ræðið, sum hevur avgerandi týdning fyri, um ein fysiskur persónur er veruligur eigari.

Eru ongir fysiskir persónar, sum hava nóg stórt ræði á felagnum, skal leiðsla felagsins skrásetast sum veruligi eigarin.

Til § 58 a, stk. 1
Ásetingin svarar innihaldsliga til § 58 a, stk. 1, 1. pkt., í galdandi vinnufelagalóg. Ætlanin er ikki, at umorðing skal bera við sær nakra innihaldsliga broyting í galdandi rættarstøðu.

Til § 58 a, stk. 2
Skotið verður upp, at feløg skulu kunna krevja upplýsingar, sum eru neyðugar til tess at eyðmerkja veruligu eigararnar, frá einum og hvørjum fysiskum ella løgfrøðiligum persóni, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á felagnum.

Skyldan at lata felagnum upplýsingarnar verður útloyst eftir áheitan frá felagnum. Er ein áheitan komin fram til persónin, hevur hesin skyldu til at hjálpa felagnum við at eyðmerkja og skráseta upplýsingarnar um veruligu eigararnar ella onnur ræðisrættindi, samsvarandi vinnufelagalógini og kunngerð nr. 5 frá 19. januar 2022 um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skráseting Føroya.

Hinvegin verður ikki álagt persónum ein skylda til at lata felagnum upplýsingarnar av egnum ávum, eins og er galdandi fyri týðandi kapitalpartar sambært § 55, stk. 1, í vinnufelagalógini.

Tær upplýsingar, sum eftir áheitan skulu latast felagnum, eru upplýsingar um tey eigararættindi, sum persónurin er vitandi um, umframt samleikaupplýsingarnar hjá viðkomandi (navn, bústaður, p-tal, o.s.fr.). Fyri fysiskar persónar fevnir hetta um tey feløg, sum persónurin eigur í, ella hevur ræði á. Løgfrøðiligir persónar skulu harumframt lata felagnum upplýsingar um sínar eigarar, bæði løgligar og veruligar eigarar.

Til § 58 a, stk. 3
Ásetingin svarar innihaldsliga til § 58 a, stk. 2, í galdandi vinnufelagalóg. Umorðingin ber ikki við sær innihaldsligar broytingar í galdandi rættarstøðu, men ber tó við sær, at tað verður neyvt lýst, at øll feløg sum meginregla hava veruligar eigarar.

Nær eitt felag kann sigast at hava *troytt allar møguleikar fyri eyðmerking*, veldst um eina ítøkiliga meting. Í metingini eigur at verða tikin hædd fyri eitt nú felagsins støddd, bygnaði, útlendskum ognarskapi, umframt øðrum viðurskiftum, sum kunnu hava týdning fyri møguleikan at eyðmerkja veruligu eigararnar. Tað er somuleiðis ein treyt, at felagið hevur roynt at sett seg í samband við veruliga eigaran, til dømis við at rykkja eftir svari, ella við at ringja beinleiðis til viðkomandi. Er veruligi eigarin ein annar løgfrøðiligur persónur, eigur felagið at seta seg í samband við løgfrøðiliga persónin á hansara skrásetta bústaði, ella seta seg beinleiðis í samband við leiðsluna í løgfrøðiliga persóninum.

Hevur eitt felag fleiri ferðir til fánýtis roynt at fingið fatur í einum persóni, sum má haldast at vera veruligur eigari, eru allir møguleikar fyri eyðmerking kortini ikki troyttir, fyrr enn felagið fyrst hevur roynt aðrar hættir at eyðmerkja veruligu eigararnar. Tað kann til dømis vera at biðja um innlit í eigaraskráir í Føroyum ella í øðrum londum, at kanna eigarabókina, ársfrásøgnina o.a.

Tað er tískil bert í undantaksføri, at eitt felag kann sigast at hava troytt allar møguleikar fyri eyðmerking. Í hesum sambandi er tað sera umráðandi, at felagið yvirfyri Skráseting Føroya kann skjalprógva tey stig, sum eru tikin til tess at eyðmerkja veruligu eigararnar. Lagt verður

tískil upp til, at undantak ikki kann nýtast, um felagið ikki í nøktandi mun hevur skjalfest tey stig, sum felagið hevur tikið til at eyðmerkja veruligu eigararnar.

Grannskoðarar hava skyldu til at gera viðmerkingar í grannskoðaraátekningini viðvíkjandi viðurskiftum, sum grannskoðari hevur fingið kunnleika til í sambandi við sítt arbeiði, tá ið viðurskiftini geva ein grundaðan varhuga av, at limir í leiðsluni kunnu koma undir endurgjaldsábyrgd ella revsiábyrgd fyri gerðir ella óvirkni, ið viðkoma virkinum, tilknýttum virkjum, virkisluttakarum, ognarum ella starvsfólkum, sambært § 7, stk. 2, 2. pkt., í kunngerð nr. 123 frá 26. juli 2019 um grannskoðaraváttanir o.a.

Av tí, at brot á ásetingarnar um innheintan, skráseting og varðveitslu av upplýsingum um veruligu eigararnar kann bera við sær revsiábyrgd fyri felagið, sbrt. § 319 í vinnufelagalógini, skal grannskoðarin tryggja sær, at felagið heldur skyldur sínar. Staðfestir grannskoðarin, at felagið ikki hevur skrásett veruligu eigararnar, at felagið hevur skrásett leiðsluna sum veruligur eigari uttan at hava roynt at eyðmerkja veruligu eigararnar, ella at felagið ikki hevur goymt skjalprógv fyri royndunum at eyðmerkja veruligu eigararnar, so skal grannskoðarin viðmerkja hetta í grannskoðaraátekningini í ársfrásøgnini.

Grannskoðarin hevur sostatt skyldu til at hava eftirlit við, at felagið skrásetir upplýsingar um veruligu eigararnar. Harafturímóti hevur grannskoðarin ikki skyldu til at hava eftirlit við, at skrásetingin og skjalprógvið fyri hesum eru røtt, ella at meta um, hvørt felagið hevur troytt allar møguleikar at eyðmerkja veruligu eigararnar.

Orðingin ”*skjótast gjørligt*” letur tað vera upp til eina ítøkiliga meting, hvussu leingi felagið kann bíða við at skráseta upplýsingar, eftir at felagið er vorðið kunnugt við upplýsingarnar. Tó kann felagið ikki uttan heilt serliga grund bíða fleiri dagar við at skráseta upplýsingarnar um veruligu eigararnar. Í hesum sambandi er tað, at evsta leiðsla felagsins til dømis ynskir at góðkenna úrslitið frá kanningini, ikki í sjálvum sær haldgóð grund til at útseta skrásetingina av úrslitinum frá kanningini.

Til § 58 a, stk. 4
Skotið verður upp, at tað verður álagt feløgum í minsta lagi eina ferð um árið at kanna, um broytingar eru í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar, til dømis broytingar í eigaraskaranum, eigaralutfallinum, atkvøðurættindunum ella onnur serlig ræðisrættindi sbr. § 55, stk. 2, í vinnufelagalógini.

Endamálið við at leggja úrslitið frá kanningini fram á aðalfundinum er at tryggja, at felagið tekur støðu til, um skrásettu upplýsingarnar um veruligu eigararnar framvegis eru rættar, ella um broytingar eru, sum skulu skrásetast skjótast gjørligt.

Til tess at tryggja, at árliga kanningin verður gjørd, verður skotið upp, at úrslitið frá kanningini skal leggjast fram á aðalfundinum, eisini hóast staðfest verður, at ongar broytingar eru í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar.

Hóast broytingar í eigaraviðurskiftunum í feløgum vanliga ikki fara fram á hvørjum ári, er ásetingin eitt lágmark fyri, hvussu ofta felagið skal gera kanningar av skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar. Í orðingini “í minsta lagi” liggur tað, at ítøkiligu umstøðurnar kunnu gera tað neyðugt at gera dagføringar og kanningar meira enn eina ferð árliga, til dømis í feløgum við nógvum og skiftandi kapitaleigarum.

Tað er leiðsla felagsins, sum hevur skyldu til at leggja úrslitið frá árligu kanningini av skrásettu upplýsingunum fram á aðalfundinum.

Staðfestir leiðslan, at ongar broytingar eru í longu skrásettum upplýsingum, eigur niðurstøðan at vera, at skrásettu upplýsingarnar enn eru nágreiniligar og løtubærar (aktuellar), og skal hetta leggjast fyri aðalfundin, eitt nú saman við avriti av eigarabókini og øðrum møguligum skjølum, sum leiðslan hevur nýtt í sambandi við kanningina. Hetta verður mett at vera serliga viðkomandi fyri feløg við einføldum eigaraviðurskiftum, til dømis 1-3 fysiskir eigarar, har broytingar ikki vanliga koma fyri á hvørjum ári.

Er leiðsla felagsins hinvegin vorðin kunnug við broytingar, sum bera við sær, at skrásettar upplýsingar um veruligu eigararnar skulu dagførast, skal hetta skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya skjótast gjørligt eftir, at felagið er vorðið kunnugt við broytingina. Tað merkir, at skráseting av broytingunum í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar ikki undir vanligum umstøðum kann bíða, til aðalfundurin er kunnaður um úrslitið frá árligu kanningini, sbr. serligu viðmerkingarnar til uppskotnu § 58 a, stk. 3.

Hevur felagið ikki goymt skjalprógv fyri, at árliga kanningin er gjørd, so kann Skráseting Føroya áseta eina freist at fáa viðurskiftini í rættlag, sbrt. § 225, stk. 2, í vinnufelagalógini. Til dømis kann Skráseting Føroya áleggja felagnum at gera kanningar fyri eldri roknskaparár, til tess at fáa greiðu á, um skrásettu upplýsingarnar um veruligu eigararnar eru nágreiniligar og løtubærar, og at skjalprógva, at kanningin er gjørd.

Verða boðini frá Skráseting Føroya ikki tikin til eftirtektar, og eru viðurskiftini sostatt ikki fingin í rættlag, so kann Skráseting Føroya í evsta føri taka stig til at tvingsilsavtaka felagið, sbrt. uppskotnu § 225, stk. 1, nr. 5.

Til § 58 a, stk. 5-6
Ásetingin í § 58 a, stk. 5, svarar innihaldsliga til § 58 a, stk. 2, 2. pkt. og 3. pkt., í galdandi vinnufelagalóg.

Uppskotna § 56 a, stk. 6, svarar innihaldsliga til § 58 a, stk. 3, í galdandi vinnufelagalóg, tó so, at "Føroya Landfúti", samsvarandi ásetingunum í hvítvasklóggávuni, er broytt til Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet.

Burtursæð frá uppskotnu broytingini í § 58 a, stk. 6, er tað ikki ætlanin at broyta rættarstøðuna viðvíkjandi ásetingunum í § 58 a, stk. 5-6. Víst verður tískil til serligu viðmerkingarnar til galdandi § 58 a í vinnufelagalógini í løgtingsmáli nr. 147 frá 2018.

Til § 58 a, stk. 7
Í galdandi vinnufelagalóg er ongin áseting, sum heimilar Hvidvasksekretariatet ella øðrum málførum myndugleikum at lata upplýsingar um veruligar eigarar til málførar myndugleikar og eftirlitsmyndugleikar á fíggjarøkinum í ES-limalondum. Hetta hóast grein 30, stk. 7, í 4. hvítvaskdirektivinum áleggur limalondunum í ES at taka stig til at tryggja, at málførir myndugleikar og sonevnd *"Financial Intelligence Units"* (FIU) rættstundis kunnu lata víðari tær upplýsingar, sum skulu skrásetast sambært § 58 a, stk. 1, í uppskotinum, til málførar myndugleikar og FIU í øðrum ES-limalondum. FIU í Danmark er *Statsadvokaten for Særlig Kriminalitet* (SSK, áður stytt SØIK).

Til tess at fremja samstarvið millum eftirlitsmyndugleikar tvørturum landamørk, verður skotið upp, at Hvidvasksekretariatet og aðrir málførir myndugleikar fáa heimild til at lata upplýsingar um veruligar eigarar, sum eru skrásettar sambært stk. 3, ella sum eru innheintaðar sambært stk. 6, til málførar myndugleikar og eftirlitsmyndugleikar á fíggjarøkinum í ES-limalondum uttan viðurgjald.

Talan er um tær upplýsingar um veruligu eigararnar, sum Skráseting Føroya letur skráseta í sínari kt-skipan, men sum ikki verða lagdar fram alment, til dømis p-tal, samleikaprógv, avrit av passi ella onnur skjøl.

Teir myndugleikar í ES-limalondum, sum skotið verður upp frameftir skulu hava rætt til at biðja um upplýsingar um veruligar eigarar, eru í fyrstu atløgu FIU-myndugleikar og aðrir málførir eftirlitsmyndugleikar á vinnufelaga- og skattaøkinum.

Til § 58 a, stk. 8
Ásetingin svarar innihaldsliga til § 58 a, stk. 4, í galdandi vinnufelagalóg, sum er eitt undantak fyri feløg, hvørs eigarapartar ella lánsbrøv verða handlað á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum. Umorðingin ber ikki við sær innihaldsligar broytingar í galdandi rættarstøðu, burtursæð frá, at undantakið frameftir eisini fer at fevna um lánsbrøv hjá slíkum feløgum.

Grundgevingin fyri undantakinum er, at børsskrásettar fyritøkur og líknandi eru fevndar av serligari lóggávu á fíggjar- og vinnufelagaøkinum, ið tryggjar nøktandi gjøgnumskygni. Harumframt hava slík feløg sambært allýsingini í § 5, nr. 26, í vinnufelagalógini ikki veruligar eigarar. Tískil skal leiðsla felagsins ikki skrásetast sum veruligi eigarin, eins og tað heldur ikki skal gerast nøkur roynd at eyðmerkja veruligu eigararnar. Eigur børsskrásetta felagið hinvegin til dømis 100% í einum dótturfelagi, skal dótturfelagið skráseta leiðsluna í børsskrásetta felagnum sum veruligi eigari dótturfelagsins.

Til § 58 a, stk. 9
Ásetingin svarar innihaldsliga til § 58 a, stk. 5, í galdandi vinnufelagalóg. Broytingin hevur ikki innihaldsligar avleiðingar við sær í mun til galdandi rættarstøðu. Lagt verður somuleiðis upp til, at kunngerð nr. 5 frá 19. januar 2022 um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skráseting Føroya, verður verandi í gildi, til reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, koma í staðin, ella tær verða settar úr gildi, sí § 5, stk. 2, í lógaruppskotinum.

Til nr. 6
Til § 58 b
Skotið verður upp at tað verður ásett sum ein treyt fyri skráseting (stovnan) av feløgum, at upplýsingar um veruligu eigararnar, heruppií rættindini hjá teimum veruligu eigarunum, skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya í seinasta lagi samstundis við skrásetingina av felagnum. Skráseting kann sostatt ikki fara fram, fyrr enn nøktandi upplýsingar um veruligu eigararnar eru latnar Skráseting Føroya samsvarandi § 58 b og § 58 a í uppskotinum. Eru ongir veruligir eigarar, so skal hetta somuleiðis skrásetast sambært § 58 b, stk. 1, 2. pkt.

Til § 58 c, stk. 1

Sambært § 9-20 í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski og fígging av yvirgangi, og sambært § 10-21 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af hvidvaskloven, hava peningastovnar, tryggingarfeløg, advokatar, grannskoðarar, ognarmeklarar og onnur skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, eitt nú tá ið eitt kundasamband verður stovnað, ella tá ið transaktiónir verða framdar, sum eru omanfyri ávís støddarmørk.

Verður fyritøkan ella persónurin í samband við kundakunnleikamannagongdir kunnug/ur við, at fráboðaðu upplýsingarnar ikki samsvara við upplýsingarnar um veruligar eigarar, ið eru skrásettar í eigarayvirlitinum hjá Skráseting Føroya, skal hetta fráboðast til Skráseting Føroya, sambært § 14 a í hvítvaskløgtingslógini og sambært § 15 a í hvidvaskloven.

Hóast hvítvasklóggávan áleggur fyritøkum og persónum fráboðanarskyldu mótvegis Skráseting Føroya, er tað ikki í dag ásett sum krav, at feløg eftir áheitan skulu útflýggja tær upplýsingar um veruligu eigararnar, sum eru neyðugar fyri at fremja eina kundakunnleikamannagongd, til fyritøkur ella persónar, sum hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir. Fyri at ongin ivi skal vera um, hvørjar skyldur eru galdandi í samband við kundakunnleikamannagongdir, verður skotið upp, at tað verður álagt feløgum skylda til at útflýggja hesum fyritøkum og persónum neyðugu upplýsingarnar um veruligu eigararnar.

Eigarayvirlitið hjá Skráseting Føroya liggur alment frammi á heimasíðuni hjá Skrásetingini. Í samband við, at kundakunnleikamannagongdir verða gjørdar, kann tað tó vera neyðugt at gera gjølligari kanningar, heruppií at biðja felagið ella løgfrøðiligu eindina útflýggja upplýsingarnar úr eigarabókini beinleiðis til fyritøkuna ella persónin, sum hevur skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir. Hetta kann til dømis vera viðkomandi, um fyritøkan ella persónurin, sum skal gera kundakunnleikamannagongdir, verður kunnug/ur við, at alment atkomuligu upplýsingarnar um løgligu ella veruligu eigararnar í einum felagi ikki eru rættar.

Til § 58 c, stk. 2
Við § 58 c, stk. 2, verður skotið upp, at tá Skráseting Føroya fær fráboðan um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum sambært hvítvasklóggávuni, skal Skráseting Føroya seta í verk eina kanning sambært § 17 og § 58 a, stk. 6, í vinnufelagalógini.

Kanningin av viðurskiftunum inniber, at Skrásetingin kann venda sær til felagið ella leiðslu felagsins, til tess at fáa greiðu á ósamsvarinum. Sambært § 17 í vinnufelagalógini kann Skráseting Føroya krevja tær upplýsingar, ið stovnurin metir neyðugar, til tess at taka støðu til, um lógin og reglur, ásettar við heimild í lógini, eru hildnar. Er talan um eitt felag, sum av misgáum ikki hevur skrásett veruligu eigararnar, ella sum av misgáum hevur skrásett skeivt, verður roknað við, at viðkomandi fær hesi viðurskiftini í rættlag undir vegleiðing Skráseting Føroya.

Skráseting Føroya kann áseta eina freist fyri, nær viðurskiftini skulu fáast í rættlag. Eru viðurskiftini ikki fingin í rættlag innan ásettu freistina, er talan um brot á skyldurnar sambært §§ 58, 58 a ella 58 b, í uppskotinum, sum kunnu bera við sær, at Skráseting Føroya tekur stig til at avtaka felagið samsvarandi § 225, stk. 1, nr. 3-5, í uppskotinum, ella at Skráseting Føroya áleggur limunum í leiðslu felagsins dagbøtur ella vikubøtur samsvarandi § 318, stk. 2, í vinnufelagalógini.

Til § 58 c, stk. 3

Í stk. 3 verður skotið upp, at Skráseting Føroya, samstundis sum kanning av ósamsvari sambært stk. 2 verður gjørd, kann almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Endamálið við frágreiðingini er at gera vart við, at Skráseting Føroya hevur fingið eina fráboðan um eitt felag, sum ber við sær, at upplýsingarnar um veruligu eigararnar eru ivasamar.

Tá støða skal takast til, um fráboðað ósamsvar í eigaraupplýsingum skal almannakunngerast, eigur Skráseting Føroya at tryggja sær, at almannakunngeringin er hóskandi, og at hon stendur mát við brotið. Í metingini eigur atlit at verða tikið til felagið og til gjøgnumskygnið í ognarviðurskiftunum hjá felagnum.

Tískil skal Skráseting Føroya, eftir at fráboðan er móttikin, gera eina meting av, hvørt tað er hóskandi og proportionalt at almannakunngera eina frágreiðing um ósamsvarið. Er talan um ósamsvar, ið kann fáast í rættlag við vegleiðing sambært reglunum um veruligar eigarar í § 58 a, er meginreglan, at almannakunngering ikki er hóskandi, ella stendur mát við ósamsvarið. Er tað hinvegin varhugi um, at talan er um tilætlaða skráseting av skeivum upplýsingum, hvørs endamál er at dylja ognarskapin, kann ein slík fráboðan um ósamsvar, almannakunngerast í kt-skipan Skráseting Føroya.

Fyri at tryggja, at ásetingin ikki verður misnýtt til at plága feløg, hevur felagið eftir stk. 3, 2. pkt., í uppskotinum møguleika at mótmæla frágreiðingini, áðrenn hon verður almannakunngjørd, tó ikki um endamálið við almannakunngeringini av frágreiðingini harvið fer fyri skeytið. Freistin hjá felagnum at greiða frá eigaraviðurskiftum felagsins er lutfalsliga stutt orsakað av, at endamálið við frágreiðingini annars kann fara fyri skeytið.

Skulu broytingar gerast í skrásettu upplýsingunum sum avleiðing av ósamsvarinum í upplýsingunum um veruligu eigararnar, skal hetta skrásetast skjótast gjørligt, sbr. § 58 a, stk. 3, í uppskotinum. Verður tað ikki gjørt, hevur Skráseting Føroya heimild til at áleggja limunum í leiðslu felagsins dagbøtur ella vikubøtur, sambært § 318, stk. 2, í vinnufelagalógini.

Tá greiða er fingin á málinum um skrásettu upplýsingarnar, skal nýggj frágreiðing almannakunngerast skjótast gjørligt. Frágreiðingin skal greiða frá, at kanningin av fráboðaðu viðurskiftunum er liðug og um niðurstøðuna av kanningini.

Til nr. 7

Sambært § 126, stk. 2, 1. pkt., í galdandi vinnufelagalóg kann meirilutin í nevndini ella eftirlitsráðnum taka avgerð um, at fundur skal haldast á øðrum máli enn á føroyskum, samstundis sum møguleiki skal vera fyri beinleiðis tulking til føroyskt. Hetta er tó í andsøgn við stk. 2, 2. pkt., sum í verandi líki ásetir, at tann avgerðin er treytað av semju í nevndini ella eftirlitsráðnum.

Orsøkin til hetta er, at orðaljóðið í § 126, stk. 2, 2. pkt., í galdandi vinnufelagalóg ikki samsvarar við § 126, stk. 2, 2. pkt., í donsku selskabsloven, som ásetir, at avgerðin hjá nevndini ella eftirlitsráðnum einans krevur semju, um fundur skal haldast á øðrum máli, *uttan beinleiðistulking*.

Við uppskotnu broytingini fer nevndin ella eftirlitsráðið at kunna taka avgerð um at halda fund á øðrum máli enn føroyskum uttan beinleiðistulking, um allir nevndar- ella eftirlitsráðslimirnir eru samdir um hetta.

Til nr. 8
Sambært § 179, stk. 2, 2. pkt., í galdandi vinnufelagalóg hevur høvuðsleiðslan ábyrgdina av, at tað, eftir útbýting av ognum felagsins, er dekningur fyri tiltakspeninginum (reservum), men ikki fyri felagskapitalinum. Við uppskotnu broytingini fer høvuðsleiðslan frameftir eisini at hava ábyrgdina av, at tað eftir útbýting er fulnaður fyri felagskapitalinum.

Av málsligum ávum er "dekningur" broyttur til "fulnaður", sum frammanundan er nýtt í eitt nú §§ 233, 254 og 302 í galdandi vinnufelagalóg.

Til nr. 9
Í § 224, stk. 2, 1. pkt., í galdandi vinnufelagalóg manglar orðið "góðkent" frammanfyri "endaliga likvidatiónsroknskapin". Við uppskotnu broytingini verður hetta fingið í rættlag.

Til nr. 10-11
Sambært galdandi § 225 í vinnufelagalógini kann Skráseting Føroya heita á skiftirættin um at avtaka feløg, sum ikki halda ávísar skyldur, eitt nú í mun til innlating av ársfrásøgn, bústaði, leiðslu o.ø. Sum er, heimilar ásetingin ikki Skráseting Føroya at heita á skiftirættin um at avtaka feløg, sum ikki halda skyldur sínar viðvíkjandi innheinting, skráseting og varðveitslu av upplýsingum um løgligu ella veruligu eigararnar.

Skotið verður upp, at § 225, stk. 1, í vinnufelagalógini verður broytt, soleiðis at Skráseting Føroya frameftir sum tvingsilsráð fer at kunna heita á skiftirættin um at avtaka feløg, sum ikki halda skyldur sínar sambært uppskotnu § 58 og § 58 a viðvíkjandi innheinting, skráseting og varðveitslu av upplýsingum um løgligu og veruligu eigarar felagsins.

Sambært uppskotnu § 225, stk. 1, nr. 3, kunnu feløg sendast til tvingsilsavtøku, um felagið ikki hevur skrásett ein ella fleiri eigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpørtum sambært § 58, sbr. § 55, stk. 1, í vinnufelagalógini (løgligir eigarar), ella um felagið hevur skrásett, at tað ikki eru nakrir eigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpørtum.

Við uppskotnu § 225, stk. 1, nr. 4, verður lagt upp til, at feløg kunnu sendast til tvingsilavtøku, um felagið ikki hevur skrásett upplýsingar um veruligu eigararnar.

Fyri at tað ikki skal bera til at sleppa sær undan skyldunum viðvíkjandi veruligu eigarunum við bert at varðveita partar av skjalprógvnum fyri upplýsingunum, verður tað skotið upp, at feløg eisini kunnu sendast til tvingsilavtøku, um til ber at staðfesta, at skjalprógvið fyri upplýsingunum er ófullkomið.

Talan er um ófullkomið skjalprógv, tá ið felagið ikki kann vísa á, at veruligu eigarar felagsins eru teir persónar, sum felagið hevur skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya, bæði viðvíkjandi slagi og vavi av eigararættindunum.

Talan er somuleiðis um ófullkomið skjalprógv, um felagið hevur skrásett, at felagið ikki hevur veruligar eigarar, ella at veruligu eigararnir ikki kunnu eyðmerkjast, tá ið felagið ikki samstundis kann skjalprógva, at felagið hevur troytt allar møguleikar fyri at eyðmerkja veruligu eigararnar. Um felagið hevur varhugan av, at ein ella fleiri persónar eru veruligir eigarar, sum ikki ynskja at geva seg til kennar, skal felagið royna at nýta aðrar mátar at eyðmerkja veruligu eigararnar, sbr. serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 5, í uppskotinum.

Skyldan hjá felagnum leypandi at innheinta og dagføra upplýsingar um veruligu eigararnar fevnir í minsta lagi um tey viðurskifti, ið felagið visti, ella átti at vitað. Tað merkir, at felagið hevur skyldu til at kanna og møguliga at dagføra upplýsingarnar, um so er, at felagið verður kunnugt við, at broytingar fara fram í viðurskiftunum viðvíkjandi veruligu eigarunum.

Hetta krav skal millum annað síggjast í ljósinum av § 55, stk. 1-2, í galdandi vinnufelagalóg, sum ásetir, at løgligu eigararnir hava skyldu til at boða felagnum frá um týðandi kapitalpostar, eitt nú tá ið farið verður upp um ávís markvirði (5%, 10%, 20%, o.s.fr.). Tað kann sostatt koma fyri, at felagið fær eina fráboðan sambært § 55, stk. 1-2, sum ber við sær fylgibroytingar í mun til veruligu eigarar felagsins, til dømis um farið verður upp um 25% av atkvøðurættindunum hjá felagskapitalinum.

Galdandi vinnufelagalóg, § 58 a, stk. 2, 2. pkt., ásetir, at feløg skulu goyma upplýsingar um veruligu eigararnar og um royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar í fimm ár eftir, at eigaraviðurskiftini hildu uppat. Skyldan at goyma upplýsingarnar fevnir um eina og hvørja roynd at eyðmerkja veruligu eigararnar, heruppií tá ið felagið staðfestir, at felagið ikki kann eyðmerkja veruligu eigararnar.

Av tí, at tað ikki skal bera til at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, ið ikki eru skjalprógvaðar, verður tað við § 225, stk. 1, nr. 5, skotið upp, at tað verður møguligt at senda feløg til tvingsilsavtøku, um felagið ikki hevur goymt skjalprógv um upplýsingarnar um veruligu eigararnar, ella um felagið hevur goymt ófullkomið skjalprógv, sbrt. uppskotnu § 58 a.

Skotið verður upp, at Skráseting Føroya við § 225, stk. 1, nr. 9, fær heimild til, sum evsti møguleiki, at heita á skiftirættin um at avtaka feløg, um tey ikki rættstundis rinda ársgjald fyri umsiting av reglunum í vinnufelagalógini.

Til tess at ásetingarnar um eigaraupplýsingar og ásetingarnar um ársgjøld skulu takast í álvara, er neyðugt við heimild til at seta tiltøk í verk, sum í evsta føri kunnu bera við sær, at felagið verður avtikið. Tvingsilsavtøka er eitt álvarsamt stig at taka, men er tað somuleiðis seinasti útvegur at fáa viðurskifti í rættlag. Sum er verður møguleikin ikki troyttur, fyrr enn felagið hevur fingið boð við áminning um at fáa viðurskiftini í rættlag innan eina freist, sum Skráseting Føroya ásetir sambært § 225, stk. 2, í vinnufelagalógini.

Viðvíkjandi uppskotnu heimildini at senda feløg til tvingsilsavtøku fyri manglandi ársgjald, verður lagt upp til, at Skráseting Føroya, áðrenn freistin sambært § 225, stk. 2, verður ásett, sendir felagnum eina vanliga áminning við gjaldsfreist.

Fær felagið viðurskifti síni viðvíkjandi skrásettu upplýsingunum um løgligu/veruligu eigararnar ella viðvíkjandi manglandi gjaldinum í rættlag innan freistina, sum Skráseting Føroya ásetir við heimild í § 225, stk. 2, í vinnufelagalógini, verður felagið ikki sent til tvingsilsavtøku. Hetta fer eisini at gera seg galdandi frameftir fyri tvingsilsavtøkur vegna manglandi ella ófullkomnar eigaraupplýsingar ella ov seint goldið ársgjald.

Fyri at fáa viðurskiftini í rættlag krevst, í mun til tvingsilsavtøku sambært uppskotnu § 225, stk. 1, nr. 3, 4 og 5, at felagið innan fyri freistina hevur fingið til vegar og hevur skrásett upplýsingar um løgligu og/ella veruligu eigararnar, og at fullkomið skjalprógv fyri innheintaðu upplýsingunum er goymt. Feløg, sum ikki áður hava goymt fullkomið skjalprógv

fyri royndunum at eyðmerkja veruligu eigararnar, kunnu sostatt fáa hesi viðurskifti í rættlag innanfyri freistina, sum Skráseting Føroya ásetir sambært § 225, stk. 2.

Í mun til tvingsilsavtøku sambært uppskotnu § 225, stk. 1, nr. 9, er tað eitt krav, at felagið hevur rindað ársgjaldið innanfyri freistina, sum Skráseting Føroya ásetir sambært § 225, stk. 2.

Megnar felagið ikki at fáa viðurskiftini í rættlag innanfyri freistina, og er felagið tískil sent í skiftirættin til tvingsilsavtøku, so ber framvegis til at heita á Skráseting Føroya um uppafturtøku innan 3 mánaðir eftir, at heitt varð á skiftirættin um at avtaka felagið. Nærri treytir fyri endurupptøku eru ásettar í §§ 231-232 í vinnufelagalógini. Tað er eitt nú ein treyt, at tey viðurskiftini, sum grundaðu, at felagið varð latið til tvingsilsavtøku, eru fingin í rættlag, t.e. í hesum føri upplýsingarnar um løgligu/veruligu eigararnar og/ella manglandi ársgjaldið.

Til nr. 12
Skotið verður upp, at "*kapitalfelag*" í § 240, stk. 1, 1. pkt., í vinnufelagalógini verður broytt til "*partafelag*". Orsøkin til hetta er, at ásetingin í § 240 í vinnufelagalógini (og § 240 í donsku selskabsloven) hava sín uppruna í grein 2 og 27 í 2. vinnufelagadirektivinum hjá ES (direktiv 77/19 EØF), sum einans fevnir um partafeløg.

Til nr. 13
Málslig rætting.

Til nr. 14-29
Sambært § 277 í galdandi vinnufelagalóg kann tann stovnur, sum hevur heimild at broyta viðtøkurnar í einum lutafelagi við avmarkaðari ábyrgd, taka avgerð um at umskapa lutafelagið til eitt partafelag sambært reglunum í §§ 278-289 í vinnufelagalógini.

Uppskotnu broytingarnar í kapitli 16 í vinnufelagalógini eru rættingar, sum eru neyðugar, tí at lógarteksturin í §§ 278-289 í fleiri støðum sipar til tað øvugta, tað er, at sipað verður til umskapan frá *partafelagi til lutafelag*. Hesin møguleiki finst ikki í § 277 í galdandi vinnufelagalóg, heldur ikki í kapitli 17 í donsku selskabsloven. Slík umskapan kann heldur ikki fara fram, uttan at partafelagið fyrst verður avtikið sambært reglunum í kapitli 14 í vinnufelagalógini.

Har, sum villur eru komnar fyri, er "lutafelag" broytt til "partafelag" og "lutaeigari" broytt til "smápartaeigari" (ella øvugt). Eisini eru gjørdar nakrar rættingar, soleiðis at ásetingarnar nú vísa til røttu heimildargreinirnar, t.e. § 287 í vinnufelagalógini.

Til nr. 30-31
Ásett er í galdandi § 319, stk. 1, í vinnufelagalógini, at brot á § 58 a, stk. 2-3, verður revsað við bót, heruppií um felagið ikki hevur skrásett upplýsingar um veruligu eigararnar, ikki hevur dagført upplýsingarnar, t.v.s. skrásett broytingar í uppýsingunum, ella um felagið ikki hevur hildið skyldu sína at goyma upplýsingarnar í minst 5 ár eftir, at eigaraviðurskiftini hildu uppat.

Av tí, at § 58 a verður broytt, er neyðugt at dagføra revsiheimildirnar samsvarandi, soleiðis at tað frameftir verður heimild fyri at revsa brot á uppskotnu § 58 a, stk. 3, 5 og 6, sum

innihaldsliga svara til § 58 a, stk. 2 og 3, í galdandi vinnufelagalóg, tó so, at myndugleikin, ið fráboðast skal til, frameftir verður Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet.

Neyðugt er eisini at gera fylgibroytingar í § 319, stk. 4, í vinnufelagalógini. Hendan áseting heimilar landsstýrismanninum at áseta í kunngerð, at brot á fyriskipanir, sum settar eru í gildi við heimild í § 58 a, stk. 5, kunnu verða revsað við bót. Ásetingin verður broytt, soleiðis at § 319, stk. 4, fer at vísa til røttu heimildarásetingina, sum frameftir verður § 58 a, stk. 9, í vinnufelagalógini.

Revsiásetingarnar skulu síggjast í tí ljósi, at tað frameftir ikki verður møguligt at stovna feløg uttan at skráseta veruligu eigararnar í seinasta lagi samstundis, og at brot á revsiheimilaðu ásetingarnar somuleiðis kunnu elva til, at stig verða tikin til at tvingsilsavtaka felagið sambært § 225, stk. 1, í vinnufelagalógini.

Til § 2

Til nr. 1
Við uppskotnu broytingini verða íognarfeløg og kommanditfeløg, ið ikki eru skrásetingarskyldug sambært § 2, stk. 3, nr. 1 ella 2, í vinnufyritøkulógini, t.e. íognarfeløg og kommanditfeløg, har allir íognarar ávikavist komplementarar ikki eru kapitalfeløg ella feløg við samsvarandi felagsformi, fevnd av skylduni at innheinta, skráseta, goyma og at lata víðari upplýsingar um veruligu eigararnar sambært uppskotnu § 15 g og § 15 h.

Einstaklingafyritøkur eru ikki fevndar av uppskotnu § 15 g í vinnufyritøkulógini. Deildir hjá útlendskum fyritøkum eru heldur ikki fevndar av ásetingini, tí talan er um sekundera stovnan, og tí ikki ein løgfrøðiligan persón. Samsvarandi er galdandi fyri deildir í Føroyum hjá føroyskt skrásettum feløgum.

Uppskotna broytingin er í samsvar við 4. hvítvaskdirektivið hjá ES, sum ikki ger skilnað millum skrásetingarskyldug íognarfeløg og kommanditfeløg, har allir interessentar ávikavist komplementarar ábyrgjast avmarkað og samsvarandi fyritøkur, har ábyrgingin er óavmarkað.

Til nr. 2-4
Uppskotnu broytingarnar í vinnufyritøkulógini svara til broytingarnar í vinnufelagalógini undir § 1, nr. 5-6, og nr. 10 til nýggja §§ 58 a, 58 b, 58 c og § 225, stk. 1, nr. 4 og 5. Víst verður til viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

Galdandi vinnufyritøkulóg ásetir, at fyritøkur, sum ikki hava avmarkaða ábyrgd, t.d. íognarfeløg, kommanditfeløg, lutafeløg (LVAÁ) og foreiningar (FVAÁ), uttan mun til, um tey skulu skrásetast sambært lógini ella ikki, skulu innheinta og skráseta upplýsingar um veruligu eigararnar, heruppií rættindini hjá teimum veruligu eigarunum.

Fyritøkan skal fáa til vegar upplýsingar um samleikan hjá veruligu eigarunum, heruppií navn, bústað, p-tal, o.s.fr. Eisini skal fyritøkan fáa til vegar upplýsingar um, hvørji rættindi persónurin hevur, tað veri seg beinleiðis ognarskap ella onnur serlig rættindi, t.d. rætt til at velja leiðsluna, vetorættindi ella líknandi.

Í samband við eyðmerking av veruligu eigarunum í fyritøkum sambært vinnufyritøkulógini, er tað umráðandi at hava í huga, at eigaraskapurin í fyritøkum ikki verður útintur við støði í

innskotnum kapitali, og at eigaraprógv ikki kunnu gevast út ella atkvøðast eftir. Viðtøkurnar hjá vinnufyritøkuni kunnu sostatt áseta, at luttakararnir atkvøða eftir meginregluni "ein maður, ein atkvøða", eftir samhandli við fyritøkuna, ella á annan hátt. Í slíkum førum er neyðugt at gera eina ítøkiliga meting av eigaraskapinum og ræðinum hjá teimum veruligu eigarunum sambært allýsingini í § 15 h í vinnufyritøkulógini og § 5, nr. 30, í vinnufelagalógini.

Sambært allýsingini í vinnufelagalógini er veruligi eigarin tann fysiski persónur, sum í síðsta enda eigur ella hevur ræði á fyritøkuni, heruppií møguliga gjøgnum eitt ella fleiri dótturfeløg. Byrjanarstøði er, at ein eigarapartur ella ræðisrættur upp á meira enn 25% av eigarapørtunum ella atkvøðurættinum ber við sær, at fysiski persónurin skal skrásetast sum veruligur eigari. Tó er tað ikki útilokað, at aðrir fysiskir persónar skulu skrásetast sum veruligir eigarar, um teir til dømis við støði í avtalu hava faktiska ræðið á fyritøkuni ella atkvøðurættindunum.

Felags fyri feløg og fyritøkur er meginreglan um, at øll feløg og fyritøkur hava veruligar eigarar. Tað er tískil bert í undantaksførum, at ein fyritøka kann sigast at hava troytt allar møguleikar fyri eyðmerking av veruligu eigarunum, sbr. viðmerkingarnar til § 1, nr. 6, í uppskotinum til nýggja § 58 a, stk. 3, í vinnufelagalógini. Eisini viðvíkjandi vinnufyritøkum er tað sera umráðandi, at fyritøkan yvirfyri Skráseting Føroya kann skjalprógva tey stig, sum eru tikin til tess at eyðmerkja veruligu eigararnar. Lagt verður tískil upp til, at undantakið í uppskotnu § 15 g, stk. 3, ikki kann nýtast, um fyritøkan ikki í nøktandi mun hevur skjalfest tey stig, sum fyritøkan hevur tikið til at eyðmerkja veruligu eigararnar.

Kann tað staðfestast, eftir at allar royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar eru troyttar, at fyritøkan ikki hevur veruligar eigarar, so er tað dagliga leiðslan, sum skal skrásetast sum veruligi eigarin.

Til nr. 5
Broytingin í revsireglunum í vinnufyritøkulógini er ein fylgibroyting. Lógaruppskotið áleggur ikki revsing fyri brot á tær skyldur, sum verða lagdar afturat verandi skyldum, men førir víðari galdandi revsiheimildir.

Til § 3

Til nr. 1
Ein rætting er gjørd í § 1, stk. 2, nr. 3, í vinnugrunnalógini, soleiðis at greinin frameftir fer at vísa til § 7 í vinnufelagalógini um avgerandi ávirkan á parta- og smápartafeløg. Við broytingini fer ásetingin at svara til § 1, stk. 2, nr. 3, í donsku vinnugrunnalógini (lov om erhvervsdrivende fonde).

Til nr. 2-3
Uppskotnu broytingarnar í vinnugrunnalógini svara til broytingarnar í vinnufelagalógini undir § 1, nr. 5 og 6, til nýggja §§ 58 a, 58 b og 58 c í uppskotinum. Víst verður til viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

Galdandi vinnugrunnalóg ásetir, at grunnar, legatir, stiftilsir og aðrir sjálvsognarstovnar (undir einum nevnt grunnar), sum verða mett at vera vinnurekandi, sbrt. § 1, stk. 1, í vinnugrunnalógini, skulu innheinta, skráseta, goyma og lata víðari upplýsingar um veruligu eigarar grunsins (navn, bústað, p-tal, o.s.fr.), heruppií rættindini hjá veruligu eigarunum.

Ein grunnur verður mettur at vera vinnurekandi, tá ið grunnurin rekur virksemi við sølu av vørum ella tænastuveitingum, sum undir vanligum umstøðum vildi borið við sær eina inntøku fyri grunnin, ella um grunnurin hevur avgerandi ávirkan á eitt parta- ella smápartafelag, sbrt. § 7 í vinnufelagalógini, sbrt. § 1, stk. 2, í vinnugrunnalógini, tó ikki um virksemið er avmarkað ella uttan týdning í mun til samlaðu ogn grunsins, sbrt. § 1, stk. 3, í vinnugrunnalógini.

Sambært fyrisitingarligari praksis fyri vinnurekandi grunnar er tað ein treyt, fyri at grunnurin kann sigast at vera ein sjálveigandi løgfrøðilig eind, at ogn grunsins endaliga er skild frá ognum stovnaranna, soleiðis at ogn grunsins hvørki leypandi ella í samband við avtøku kann falla aftur til stovnaran. Harumframt er tað ein treyt, at ræðisheimildirnar yvir grunninum eru lagdar til eina sjálvstøðuga leiðslu, sum er óheft av stovnaranum.

Limir í nevnd grunsins eru altíð at meta sum veruligur eigari, sbrt. § 56 c, stk. 1, nr. 1, í vinnugrunnalógini. Í tann mun ávísir nevndarlimir hava serlig eigaralíknandi rættindi mótvegis grunninum, t.d. rætt til at eitt ávíst avkast av ognum grunsins, ella ávís fyrisitingarlig rættindi, (rætt til at góðkenna sølu av ognum ella líknandi), skulu hesi rættindi skrásetast.

Stovnari, sum er limur í nevndini, verður altíð mettur at vera veruligur eigari. Stovnari, sum ikki er limur í nevndini, kann samsvarandi einari ítøkiligari meting vera veruligur eigari, um stovnarin sambært viðtøkunum hevur rættarkrav at taka við einum ikki týdningarleysum parti av ognum grunsins. Eru rættindini hjá stovnaranum hinvegin avmarkað til eitt ávíst avkast av ognum grunsins, t.d. rentunýtingarrætt, bústaðarrætt ella brúksrætt, ella hevur stovnarin ávís avmarkað fyrisitingarlig rættindi, t.d. vetorættindi, so ber hetta ikki í sjálvum sær við sær, at stovnarin er veruligur eigari.

Aðrir persónar, sum serliga fáa frá grunninum, ella um so er, at teir persónar, sum serliga fáa av útlutan grunsins, enn ikki eru kunnugir fyri grunninum, tann bólkur av persónum, í hvørs høvuðsáhugamáli grunnurin er stovnaður, skulu eisini skrásetast sum veruligir eigarar, sbrt. § 56 c, stk. 1, nr. 2, í vinnugrunnalógini.

Týðandi gávugevarar, stuðulsveitarar ella líknandi, ið ikki eru limir í nevnd grunsins, eru í útgangsstøði heldur ikki at meta sum veruligir eigarar, tá ið gávugevarar v.m. eru at javnseta við stovnara grunsins.

Skyldurnar viðvíkjandi upplýsingunum um veruligu eigararnar fevna eisini um grunnar, sum eru settir á stovn við lóg ella sambært lóg, og sum eru undir almennum eftirliti, sbrt. § 1, stk. 8, sbrt. § 56 b í vinnugrunnalógini, óansæð um grunnurin annars fellur uttan fyri øki lógarinnar sbrt. § 1, stk. 4, ella er undantikin lógini sbrt. § 1, stk. 5, í vinnugrunnalógini.

Aðrir grunnar, sum lúka treytirnar fyri at vera ein grunnur, men sum ikki eru vinnurekandi, eru ikki fevndir av vinnugrunnalógini, og eru tískil ikki fevndir av skyldunum sambært hesum uppskoti. Hetta ger seg m.a. galdandi fyri grunnar, sum sambært viðtøkunum hava eitt almannagagnligt ella vælgerandi endamál, tó treytað av, at veruliga virksemið í grunninum samsvarar við ítøkiligu lýsingina av endamálinum sambært viðtøkunum.

Almannagagnligir ella vælgerandi grunnar kunnu sostatt metast at vera vinnurekandi sambært vinnugrunnalógini, óansæð hvat endamál er ásett í viðtøkunum, um grunnurin hevur eitt slíkt samband við eitt vinnurekandi felag ella fyritøku, at grunnurin ítøkiliga má metast at vera

vinnurekandi sambært vinnugrunnalógini. Almannagagnligir og vælgerandi grunnar verða somuleiðis í byrjanarstøðinum mettir at vera vinnurekandi um so er, at almannagagnliga virksemið skal fíggjast við inntøkum frá t.d. framleiðslu ella útleigan av ognum grunsins.

Uppskotið til broyting í vinnugrunnalógini fevnir ikki um sonevndar "trusts", sum er ein virkisháttur við uppruna í enskum rætti. Ein trustur er ikki tað sama sum ein føroyskur grunnur.

Nærri reglur um skyldur viðvíkjandi innheinting, skráseting, varðveitslu og at lata víðari upplýsingar um veruligu eigararnar í trustum eru ásettar beinleiðis í kapitli 8 í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 (hvítvasklógin).

Til nr. 4-5
Broytingin í revsireglunum í vinnugrunnalógini er ein fylgibroyting. Lógaruppskotið áleggur ikki revsing fyri brot á tær skyldur, sum verða lagdar afturat verandi skyldum, men førir víðari galdandi revsiheimildir.

Til § 4

Til nr. 1-3
Uppskotnu broytingarnar í tryggingarlógini svara til broytingarnar í vinnufelagalógini undir § 1, nr. 5 og 6 til nýggja §§ 58 a og 58 c. Víst verður til viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

Sínámillum tryggingarfeløg virka sum feløg (foreiningar), sum limirnir (tryggingartakararnir) eiga. Millum limirnar verður valt eitt ávíst tal av umboðsfólki samsvarandi viðtøkunum fyri felagið, sum umboða limirnar á aðalfundinum. Umboðsfólkini velja eina nevnd millum limirnar, sum er evsta leiðsla felagsins. Nevndin setur í samsvari við viðtøkurnar eina stjórn at taka sær av dagligu leiðsluni.

Tvørgangandi eftirlønargrunnar eru eitt slag av feløgum (foreiningar), har kollektivið av tryggingartakarunum/limunum eiga eginognina, uttan so at viðtøkurnar áseta annað. Viðvíkjandi leiðslu er tað galdandi, at ein eftirlønargrunnur skal hava eina nevnd, sum skal vera samansett av formanni og einum líka tali av nevndarlimum, og av hesum skal í minsta lagi helvtin verða vald av og millum limirnar í eftirlønargrunninum. Ein tvørgangandi eftirlønargrunnur skal hava eina nevnd og eina stjórn. Samsvarandi allýsingini av veruligum eigarum verður nevndin í eftirlønargrunninum tískil mett at vera veruligur eigari.

Tað verður mett at verða heimilað at lata víðari upplýsingar sbrt. tagnarskylduna hjá fíggjarligum fyritøkum í § 74 í tryggingarlógini, sum fíggjarfyritøkan hevur skyldu til at lata víðari eftir áheitan frá viðkomandi myndugleikum við heimild í ásetingunum um skráseting av upplýsingum um veruligar eigarar. Við uppskotnu § 17 a fer hetta eisini at fevna um fyritøkur og persónar, sum sambært hvítvasklóggávuni hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir.

Til nr. 4
Broytingin í revsireglunum í tryggingarlógini er ein fylgibroyting. Lógaruppskotið áleggur ikki revsing fyri brot á tær skyldur, sum verða lagdar afturat verandi skyldum, men førir víðari galdandi revsiheimildir.

Til § 5

Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó kemur ásetingin í § 2, nr. 1, í uppskotinum, t.e. § 2, stk. 3, 1. pkt., í vinnufyritøkulógini í gildi seinni við kunngerð frá landsstýrismanninum. Orsøkin til hetta er, at verandi kt-skipan Skráseting Føroya ikki rúmar skráseting av upplýsingum um íognarfeløg og kommanditfeløg, ið ikki eru skrásetingarskyldug sambært vinnufyritøkulógini. Ein nýggj kt-skipan er í væntu (Virkisskrá), og mett verður, at tað er hóskandi, at hendan broyting verður sett í gildi, tá ið Virkisskráin er liðugt ment og er tikin í nýtslu.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 30. januar 2024

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringsnotat frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 3: Lov om ændring af selskabsloven m.v. – LSF 205 2018
Fylgiskjal 4: Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 5: Felagið Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 6: Fíggjarmálaráðið
Fylgiskjal 7: Taks
Fylgiskjal 8: Føroya Landfúti